

# SENDISTOVA FÖROYA Í LONDON

Toska- og hýsumarknaðurin í Stórabretlandi
og okkara støða sum útflytari

## Formæli

Nógv orðaskifti hevur verið seinastu árini um lutfallsliga stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum toski og hýsu til Stórabretlands. Ymiskar áskoðanir eru, um hvør orsøkin er til hesa gongd, og hvørt hetta fyribrigdið er ein trupulleiki ella ikki. Sjónarmiðini eru ofta litaði av teimum áhugamálum, sum viðmerkjarin umboðar, og greitt er, at fiskimaðurin, virkiseigarin, verkamannafelagsfólk og politikkarar ikki altíð hava somu áhugamál.

Sendistova Føroya í Stórabretlandi hevur sum partur av sínum virksemi fylgt gongdini í fiskivinnuni í Stórabretlandi seinastu árini, og er greitt at stórar broytingar fara fram. Talan er um broytingar í alheimssamfelagnum og lokalt í Stórabretlandi, sum ávirka føroyska fiskivinnu.

Stóra Bretland hevur síðani vinnuligur fiskiskapur tók seg upp kring Føroyar, verið ein høvuðsmarknaður fyri serliga tosk og hýsu. Ætlanin við hesi frágreiðing er serliga at hyggja eftir rákinum á hesum marknaði, og hvussu vit kunnu vænta, at føroysk fiskivinna verður ávirkað av hesum.

Frágreiðingin lýsir føroyska útflutningsmynstrið, bæði hagtalsliga og við atliti at marknaðinum. Ein viðgerð er av føroysku kappingarstøðuni, og mett verður um framtíðar útlit. Greitt er, at sum støðan er í løtuni, eru útlitini ikki serliga bjørt. Spurt verður tí í frágreiðingini: ”Hvat er til ráða at taka?”

Frágreiðingin roynir at svara hesum spurningi og setir fram eina hugsjón, hvussu føroysk fiskivinna kann gerast betri kappingarfør, og verða ymisk viðurskifti lýst, sum eru ein fyritreyt fyri, at hendan hugsjónin kann gerast veruleiki.

Vit ásanna, at útflutningur av óvirkaðum fiski er eitt fyribrigdi, sum kann síggjast úr fleiri sjónarhornum. Hinvegin eiga vit at ásanna, at er hetta fyribrigdið ein avleiðing av einum vánaligum kappingarføri, sum vit hava ávirkan á, eiga vit at umhugsað, hvussu vit kunnu betra um kappingarførið fyri á tann hátt at fáa so mest fyri okkara rávørutilfeingi sum gjørligt. Tað er umráðandi, at myndugleikar skapa neyðugar fyritreytir, sum geva vinnuni møguleikar at finna fram til ta framleiðslu, sum er kappingarfør og lønandi.

# Innihaldsyvirlit


Formæli 2
Bygnaður, kanningarháttur, keldur og avmarkingar 5
Heimsmarknaðurin 7
Støðan í heimsútboðnum 7
Heimsrákið í nýtsluhættum 8
Rákið á hvítfiskamarknaðinum 9
Marknaðarrák og vørusløg 11
Toskur 11
Hýsa 11
Framtíðarútlit 12
Framleiðsla 13
Marknaðarstøðan í Stórabretlandi 14
Útboð 14
Landingar í Stórabretlandi 14
Innflutningur til Stórabretlands 15
Nýtsla og marknaðarrák í Stórabretlandi 16
Smásøluøkið 16
Foodservice (matstovur og stovnar) 17
Køldar vørur 18
Frystar vørur 18
Kappingin frá láglønarsamfeløgum 19
Bygnaðurin á bretska marknaðinum 20
Niðurstøða 22
Útflutningsmynstrið 24
Innflutningur til Stórabretland 24
Onnur útflytaralond og útflutningsvirði 25
Toskur 27
Hýsa 30
Marknaðarsamskipan 32
Sølumynstur 33
Niðurstøða 35
Hvat er til ráða at taka? 36
Er tað møguligt hjá føroysku framleiðsluvinnuni at flyta seg fram í virðisketuni 38
Týðandi viðurskifti - skulu vit flyta okkum nærri marknaðinum 39
Góðska og góðskustýringsskipanir 39

Sporføri (traceability) 39
Kostnaður og prísur 40
Burðardygg fiskiveiðiumsiting (sustainability) 41
Grindadráp 42
Samskipan av flutningi 43
Strategic Partnership 44
Vøru- og marknaðarmenning 45
Niðurstøða 47
Viðgerð og raðfesting av týdningarmiklum viðurskiftum 47
Onnur týdningamikil viðurskifti 48
Til seinast 49
Fylgiskjal I – Bygnaðurin á bretska marknaðinum 50
Innflutnings- og útflutningsumboð 50
Uppboðssølumarknaðir og innlendismarknaðir 50
Uppboðsølumarknaðirnir 50
Innlendismarknaðir 51
Keypmenn (Traders) 51
Framleiðsla 52
Frumframleiðarar 52
Aðruhonds framleiðarar 52
Heilsølur 54
Smásøluliðurin (ketuhandlar og fiskaseljarar) 54
Matstovumarknaðurin og almennir stovnar (Foodservice) 55

# Bygnaður, kanningarháttur, keldur og avmarkingar

Í hesum brotinum verður stutt greitt frá bygnaðinum av frágreiðingini, kanningarháttinum og teimum keldum, sum eru brúktar til at kunna skriva frágreiðingina.

Áherðsla er løgd á, at frágreiðingin hevur eitt náttúrligt ”flow”, soleiðis at frágreiðingin hongur saman, um lisin frá byrjan til enda. Í stuttum kann sigast, at frágreiðingin er býtt í tveir partar, ein lýsandi (deskriptivan) og ein greinandi (analytiskan). Bygnaðurin kann myndast soleiðis:




## Bygnaðurin av frágreiðingini

Tann lýsandi parturin av frágreiðingini byggir fyri tað mesta á aðruhonds keldur, tvs. ymiskar frágreiðingar og hagtøl. Serliga viðkomandi hevur frágreiðingin hjá SEAFISH, “Seafood Industry Value Chain Analysis: Cod, Haddock and Nephrops” frá 2004, verið. Frágreiðingin er brúkt sum grundarlag fyri pørtum av tí lýsandi tekstinum.

Hagtølini eru frá ymiskum keldum. Hagtølini, sum eru brúkt til greiningar av føroyska útflutninginum, eru frá Hagstovu Føroya, Toll- og Skattstovu Føroya og Fiskiveiðieftirlitinum.

Fyri at kunna gera eina eftirfarandi greining av teimum viðurskiftum, sum eru týdningarmikil fyri eina menning av føroyskari fiskaframleiðslu, soleiðis at hon kann flyta seg nærri marknaðinum, ella longri fram í virðisketuni, vóru samrøður við fleiri persónar. Talan var

um persónar umboðandi ymisku “aktørarnar” í Stórabretlandi og persónar umboðandi føroyska fiskivinnu.

Frágreiðingin er avmarkað á tann hátt, at hon bert fevnir um bretska marknaðin. Talan er tí um eina “partiella analysu”, sum ikki tekur stórvegis hædd fyri marknaðargongdini á øðrum toska- og hýsumarknaðum. Hetta kann verða ein trupulleiki, tí ikki øll viðurskifti verða tikin við í viðgerðina av ymiskum hendingum. Til dømis vita vit, at útflutningsmynstrið fyri tosk er nær tengt at saltfiskamarknaðinum, og somuleiðis hevur virði á amerikanska gjaldoyranum týdning fyri útflutningin av toski og hýsu til USA. Neyðugt er at hava hesar avmarkingar í huganum, og taka hædd fyri teimum, tá niðurstøður verða gjørdar.

# Heimsmarknaðurin

## Støðan í heimsútboðnum

Menningin í nýtsluni av sjóføðslu er vaksandi, bæði í ídnaðarlondum og menningarlondum. Miðalnýtslan av sjóføðslu er økt úr 9,0 kg, fyri hvønn íbúgva í 1961 til 16,1 kg í 1997. Í ídnaðarlondum øktist miðalnýtslan úr 19,7 kg til 27,7 kg fyri hvønn íbúgva sama tíðarskeið.

United Nations Food and Aquaculture Organisation (FAO) metir, at samlaða heimsveiðan fer at røkka uml. 107,6 mió. tons í ár 2030. Samlaða framleiðslan í alivinnuni verður mett at økjast munandi úr uml. 28,6 mió. tonsum í 1997 til 82,6 mió. tons í 2030.

**Talva 1. Heimsframleiðsla og nýtsla av sjóføði 1990-2001 (Nøgd í mió. tonsum)**

| | 1990 | 1992 | 1994 | 1996 | 1998 | 2000 | 2001 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Innlendis fiskivinna | | | | | | | |
| Aling | 8.2 | 9.4 | 12.1 | 15.9 | 18.5 | 21.4 | 22.4 |
| Veiða | 6.6 | 6.3 | 6.9 | 7.4 | 8.0 | 8.8 | 8.8 |
| Tilsaman | 14.8 | 15.6 | 19.0 | 23.3 | 26.5 | 30.2 | 31.2 |
| Sjóvarframleiðsla | | | | | | | |
| Aling | 4.9 | 6.1 | 8.7 | 10.8 | 12.0 | 14.2 | 15 .1 |
| Veiða | 79.3 | 80.0 | 85.8 | 86.1 | 79.3 | 86.0 | 82.5 |
| Tilsaman | 84.2 | 86.1 | 94.4 | 96.9 | 91.3 | 100.2 | 97.6 |
| Samanlagt | | | | | | | |
| Aling | 13.1 | 15.5 | 20.8 | 26.7 | 30.5 | 35.6 | 37,5 |
| Veiða | 85.9 | 86.2 | 92.7 | 93.5 | 87.3 | 94.8 | 91.3 |
| Tilsaman | 99.0 | 101.7 | 113.5 | 120.2 | 117.8 | 130.4 | 128.8 |
| Nýtsla | | | | | | | |
| Til matna | 70.8 | 72.4 | 80.0 | 88.0 | 92.7 | 96.7 | 99.4 |
| Ídnaðar (mjøl, olja) | 28.2 | 29.3 | 33.5 | 32.2 | 25.1 | 33.7 | 29.4 |

Kelda: Seafood Industry Value Chain Analysis: Cod, Haddock and Nephrops, KPMG and Seafish, 2004, p. 20. FAO: "The State of World Fisheries and Aquaculture 2002", FAO, Rome, 2003




**Myndil 1. Framtíðar útboð og eftirspurningur av sjóføði**
Kelda: Forsøgn gjørd av KPMG bygt á viðgerð av hagtølum frá FAO




**Myndil 2. Framtíðar framleiðsla av sjóføði**
Kelda: 1990 – 2001: FAO FISHSTAT; projections 2002 – 2020: Hempel Consult

Størsta íkastið til økingina í fiskaframleiðsluni kemur væntandi frá alivinnuni. Íkastið frá fiskiveiði til samlaðu fiskaframleiðsluna er treytað av, hvussu effektiv fiskiveiðiumsitingin verður. Um framstig verða gjørd í umsitingini av núverandi stovnum, ið eru ovurfiskaðir, kann hetta merkja eina øking í framleiðsluni við millum 5 og 13 mió. tonsum. Hinvegin, við áhaldandi ovfisking, vil hetta hava við sær eina minking í framleiðsluni.

## Heimsrákið í nýtsluhættum

Etivanar og keypsmynstur verða ávirkaði av nýggjum vørum, vanum og nýggjum lívshættum. Tað er umráðandi hjá føðsluídnaðinum at vera ansin og varugur við hesi rákini, tí hesi ávirka sambandið millum nýtaran og vørunar.

Tøl frá søluliðnum avdúka nøkur av teimum rákum, ið gera um seg í løtuni. Hesi eru samanumtikið:

- Vaksandi útboð av høgleikavørum
- Øking í útboðnum av feskum køldum vørum
- Vaksandi áhugi fyri eksotiskum fiskavørum
- Vørunar hava sum heild longri haldføri
- Alt fleiri vørur eru feskar og portiónspakkaðar
- Vaksandi áhugi fyri góðsku og føðitrygd
- Nýtararnir sýnast at vera meiri upptiknir um heilsu

Viðvíkjandi skipanini av søluni og veitingini av føðslu, so er týðiligasta rákið tann áðhaldandi flytingin frá smærri sølustøðum til enn størri sølu- og handilsmiðstøðir og vøksturin hjá teimum stóru handilsketunum. Í ávísum londum umboða handilsketurnar í dag yvir 60% av samlaðu matsøluni.

Valdið hjá handilsketunum er gjølliga kannað og staðfest seinastu árini. Hetta merkir, at tað gerst enn meiri umráðandi at laga seg eftir rákinum í hesum handilsstøðum, nú ein alsamt størri partur av handilinum fer um tær stóru altjóðafyritøkurnar.

## Rákið á hvítfiskamarknaðinum

Toskur og hýsa eru tvey týdningarmikil fiskasløg í altjóða hvítfiskamarknaðinum, ið fevnir um fleiri fiska- og vørusløg. Hvítfiskamarknaðurin er sera fløktur og við einari truplari og skiftandi virðisketu.

Seinastu 50 árini hevur samlaða útboðið av hvítfiski verið skiftandi millum 3 og 11 mió. tons. Veiðan øktist munandi frá 1950 til 1974, men síðani kom ein bráðlig niðurgongd í talinum av landingum. Talið av landingum øktist aftur so við og við, og vóru hesar í hæddini í 1987 við 11,5 mió. tonsum. Lægsta nøgdin seinastu 20 árini var í ár 2000 við bert 5,9 mió tonsum. Síðani 1985 hevur tó altjóða útboðið av hvítfiski verið fallandi, og FAO metir, at eitt framhaldandi fall verður í útboðnum av hvítfiski.




**Myndil 3. Gongdin í landingum av týdningarmiklastu hvítfiskasløgunum**
Kelda: FAO FISHSTAT

Serliga hevur minkingin í veiðuni eftir Alaska pollock ávirkað afturgongdina. Í 1986 vórðu landaði uml. 7 mió. tons av Alaska pollock. Tó minkaðu hesar landingar niður í bert 3,1 mió. tons í 2001.

Landingar av toski eru minkaðar munandi seinastu 30 árini. Landingarnar vóru í hæddini í 1968 við yvir 4 mió. tonsum, meðan í 2000 vóru samlaðu landingarnar av toski minni enn 1 mió. tons. Veiðan í Barentshavinum hevur verið rættiliga støðug, samanborið við onnur veiðiøki. Tað hava verið umfatandi trupulleikar við eysturstrondina í Norður Ameriku, har eitt fyrbils veiðibann varð sett fyri nøkrum árum síðani.

Hvítfiskaveiðan í Norður Atlantshavi er eisini minkað munandi seinastu árini. Í hesum økinum vóru samlaðu hvítfiskalandingarnar uml. 3,4 mió. tons í 1986. Í ár 2001 var sama veiðan minka niður í bert 1,6 mió tons.

Væntað verður ikki, at landingarnar av toski fara at vaksa munandi komandi árini. Hetta kann elva til, at toskurin fer at missa marknaðarpartar til onnur fiskasløg, soleiðis sum hann hevur gjørt tey seinastu 10 árini.




**Myndil 4. Heimslandingar av hýsu og atlantstoski**
Kelda: FAO FISHSTAT

Seinastu árini eru “nýggj” hvítfiskasløg komin á marknaðin, ið til ein vissan mun, eru komin í staðin fyri vanligu hvítfiskasløgini sum toskur, hýsa og upsi. Aldur feskvatnsfiskur sum t.d. “channel catfish” og “tilapia”, mynda í dag ein alsamt størri part av samlaða útboðnum av hvítfiski. Til dømis var framleiðslan av tilapia uml. 1,9 mió. tons í ár 2000, ella næstan ein triðingur av samlaða útboðnum av hvítfiski. Meginparturin av hesari framleiðsluni var alifiskur. Enn er bert ein lítil partur av hesari framleiðslu komin inn á heimsmarknaðin fyri hvítfisk. Stórur partur av tilapia framleiðsluni verður seldur til m.a. Kina. Tó vísir núverandi gongdin, at ein alsamt størri partur, serliga av tilapia framleiðsluni verður selt, serstakliga sum fryst fløk, á lág-virðis hvítfiskamarknaðinum.

## Marknaðarrák og vørusløg

Sum áður nevnt, so er virðisketan fyri hvítfiskasløg sera fløkt og ymisk, við einari rúgvu av ymiskum vørum og skiftandi prísløgum. Harafturat kann góðskan á hesum vørum vera sera ymisk.

Bert ein lítil partur av samlaða útboðnum verður selt sum feskur fiskur. Hóast hetta, so boðar gongdin á marknaðinum frá, at ein størri partur av toskinum verður seldur feskur, antin til matstovumarknaðin ella sum rávøra til feskar portiónspakkaðar vørur, sum verða seldar gjøgnum handilsketur. Tað verður mett, at henda gongdin fer at gerast alsamt sterkari komandi árini.

## Toskur

Toskur verður framleiddur til fleiri ymiskar vørur, sum í høvuðsheitum kunnu verða skipaðar í vørubólkarnar: fløk (fesk og fryst), saltaður (vát- ella turrsaltaður), feskur (avhøvdaður og kruvdur ella bert kruvdur) og rundur (feskur ella rundfrystur). Myndil 5 vísir á leið heimsfevnandi gagnýtsluna av hesum vørubólkum í prosentum.




**Myndil 5. Alheims gagnnýtslan av atlantstoski**
Kelda: Groundfish Forum 2001

## Hýsa

Somu vørubólkarnir eru at finna í virðisketuni fyri hýsu, sum í virðisketuni fyri tosk. Hinvegin skilir gangnýtslan í prosentum av hýsuni seg munandi frá toskinum. Myndil 6 vísir alheims gangnýtsluna av hýsu í prosentum.




**Myndil 6. Alheims gagnnýtslan av hýsu**
Kelda: Groundfish Forum 2001

## Framtíðarútlit

Yvirhøvur verður væntað, at alheimsútboðið av hvítfiski framvegis fer at minka. Hetta skuldi havt við sær tekin um príshækkingar, men tað eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi.

Í fyrsta lagi er talan um stórar nøgdir av toski og hýsu úr Barentshavinum, ið verða sendar til Kina, har hesar verða skornar til flak. Fløkini verða síðani send aftur til Evropa og USA sum láprísvørur, har hesar kappast við vørur frá vanligu veitarunum. Um nøgdirnar, virkaðar í Kina, framvegis verða stórar, fer hendan gondin at trýsta prísin niðureftir.

Í øðrum lagi sæst alifiskur í størri nøgdum á marknaðinum, sum t.d. tilapia, sjóáburri (seabass) og steinbítur (catfish) í beinleiðis kapping við tosk, hýsu og lýra (pollock). Aftur her kann Kina fáa ein avgerandi leiklut í hesi menningini. Yvir 600.000 tons av teimum samlaðu 1.2 mió tonsum av tilapia alifiskinum kemur úr Kina. Í seinastuni eru stórar íløgur gjørdar í Kina, t.d. í stórar tilapia alistøðir, umframt at íløgur verða gjørdar, ið skulu stimbra einari áhaldandi menning av nútímans framleiðsluvinnu, sum í høvuðsheitum skal framleiða vørur til útflutnings.

Prísurin á hvítfiskafløkum og blokki lá støðugur í árunum 2001 – 2002 og við einari minni hækking í 2003. Tá ið trot er á útboðnum av vanligu hvítfiskasløgunum, skuldu vit roknað við, at prísurin kvinkaði uppeftir, sum tað hevur verið at sæð fyri ávísar vørur. Kortini hevur kappingin frá øðrum vørum forða fyri einari príshækking. Talan er ikki bert um kapping frá øðrum hvítfiskasløgum, men eisini frá t.d. laksi, sum nú kann tykjast at vera ein bílig vøra. Munandi príshækkingar eru ikki væntaðar í nærmastu framtíð.

Tað er umráðandi at geva gætur, at bíligar hvítfiskavørur eisini mugu kappast við aðrar proteinkeldur, sum t.d. høsnarungar og aðrar hvítkjøtavørur.

Viðvíkjandi feskfiskamarknaðinum, kunnu væntast fleiri vørur við betri góðsku fyri hægri prísir, so hvørt fiskivinnan tillagar seg nýggju viðgerðar- og flutningstøknina. Tað er eitt vaksandi virksemi, at stórar nøgdir av feskum toski verða fluttar við flogfari til Stórabretlands. Hetta virksemi verður væl móttikið av marknaðinum.

Umframt hevur menningin av ketuhandlum havt stóra ávirkan á søluna av feskum fiski. Í enn størri mun verður feskur fiskur liðugt pakkaður og seldur gjøgnum stórar ketuhandlar. Hendan gongdin fer væntandi at gerast sterkari komandi árini og kann hava við sær øktan áhuga millum nýtarar fyri liðugt pakkaðum hvítfiskavørum.

## Framleiðsla

Seinastu 50 árini er ein kollveltandi menning farin fram í framleiðslu og varðveitslu av sjóføði. Haldføri á vørunum var munandi longt við uppsetingini av frystiútgerð og hópútbreiðsluni av køliútgerð í 1950'unum. Um somu tíð hækkaði góðskustøðið á sjóføðslu ómetaliga nógv.

Sjálvt um menningin er komin langt ávegis í sonevndum køliketum, so eru tað enn fleiri støð í heiminum, ið ikki hava atgongd til neyðugu tøknina og útgerðina. Tískil eru tey á hesum støðum enn bundin at teimum vanligu gomlu hættunum til tess at varðveita vørurnar, sum t.d. at turka og salta.

Frysting av vørum er eisini tengd at stórum íløgum í útgerð, umframt at hetta er sera kostnaðarmikið í orkugjaldi. Hetta hevur elvt til høgan prís á frystum fiski í nógvum heimspørtum, samstundis sum góðskan á frystum fiskavørum verður hildin at verða lægri, enn góðskan á feskum/køldum vørum.

Menningin av hávirðis alivinnu, serliga laksaaling, hevur ført til stór frambrot í feskfi-

ska viðgerðartøknini og útbreiðsluni. Hesar tøknirnar eru enn ikki fult gagnnýttar, og kundu hesar verið nýttar av einum størri parti av sjóføðsluvinnuni. Hetta kundi hækka góðskustøðið á feskum fiski, og havt við sær, at størri nøgdir av feskum fiski komu á marknaðin. Ein onnur menning í hesi tøknini sæst í menningini av tøkni- og flutningsmøguleikum av livandi fiski.

## Marknaðarstøðan í Stórabretlandi

Stórabretland er ein av teimum mest áhugaverdu marknaðunum fyri sjóføðslu í Evropa. Nýtslan av hvítfiski hevur leingi verið sera haldgóð, bæði heima við hús, uttanfyri heimið, á matstovum, fisk og kips búðum og ymiskum stovnum.

Stórabretland hevur eisini ein munagóðan fiskiflota. Í seinastuni eru broytingar tó framdar, sum hava havt við sær ein niðurskurð av fiskiflotanum, minni tal av landingum, og tískil eru tey vorðin meiri bundin at fiskainnflutningi.

### Útboð

**Landingar í Stórabretlandi**




**Myndil 7. Samlaðu landingarnar í Stórabretlandi 1990-2002 (livandi vekt)**
Kelda: DEFRA

Heildarlandingarnar frá bretskum og útlendskum skipum í 2002 vóru 537,900 tons við einum virði uppá £490,1 mió. Av landingarnøgdini var toskur 5,8 % og hýsa 10,7%.

| | Landingar tils. | | Útlendsk skip | | Bretsk skip | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | tons | £000 | tons | £000 | tons | £000 |
| Toskur | 31.600 | 42.200 | 5.860 | 7.210 | 25.740 | 34.990 |
| Hýsa | 57.500 | 40.300 | 5.637 | 5.642 | 51.863 | 34.658 |
| Botnfiskur tils. | 235.800 | 265.900 | 57.734 | 67.530 | 178.066 | 198.370 |
| Øll fiskasløg | 537.900 | 490.100 | 72.273 | 75.372 | 465.627 | 414.728 |

**Talva 2. Landingar í Stórabretlandi í 2002 (tons, livandi vekt)**
Kelda: UK Sea Fisheries Statistics 2002, DEFRA

Heildarveiðan hjá bretskum skipum av toski og hýsu er annars minkað síðani 1996. T.d. vóru landingar frá bretskum skipum 80,000 tons í 1996, mótvegis 31,600 tonsum í 2002. Virðið á tí landaða toskinum er samsvarandi minkað frá £74,2 mió. niður í £42,1 mió. Minkingin hevur verið minni fyri hýsuna, frá næstan 90,000 tonsum í 1998 til 57,000 tons í 2002. Heildarvirðið á landingunum av hýsu var £55 mió. í 1994, meðan virðið var £35,5 mió. í 2002.

## Innflutningur til Stórabretlands

Seinastu tíggju árini er innflutningurin av sjóføðslu til Stórabretlands øktur bæði í nøgd og virði.




**Myndil 8. Innflutningur av sjóføði til Stórabretlands (øll fiskasløg)**
Kelda: DEFRA

Stórabretland innflutti í 2002 samanlagt 620,000 tons av sjóføðslu við einum virði uppá £1,4 mia. Samanlagdi innflutningurin í 2002 av botnfiski og pelagiskum fiski var 515,000 tons við einum virði uppá £1,028 mió. Av hesari nøgdini fevndi toskurin umleið 23,5% og hýsan umleið 9,5%.  Afturat hesum vóru innflutt 105,000 tons av skeljafiski.

Samanborið við onnur innflutt fiskasløg, so eru toskur og hýsa, eftir nøgd, millum trý tey ovastu sløgini.




**Myndil 9. Innflutningur til Stóra Bretlands av útvaldum fiskasløgum í 2002**
Kelda: DEFRA

## Nýtsla og marknaðarrák í Stórabretlandi

Í frágreiðingini hjá Seafish "Seafood Industry Value Chain Analysis: Cod, Haddock and Nephrops, KPMG and Seafish, 2004" verður mett, at bretsku brúkararnir brúktu umleið £4,0 mia. uppá sjóføðslu í 2002. 2 mia. av hesum var selt gjøgnum smásøluliðið (ketuhandlar og fiskaseljarar), har ketuhandlarnir alsamt styrkja um sína marknaðarstøðu við umleið 90% av hesari søluni.

Nýtslan í Stórabretlandi av sjóføðslu er annars vaksandi, har størsti ágóðin av hesum vøkstri fer til ketuhandlarnar. Vanligi fiskahandlarin missur sín part av marknaðinum og er um at hvørva fullkomiliga úr myndini. Hetta er ein generel gongd, sum er sjónlig á øllum evropeiska meginlandinum.

Í miðal var nýtslan hjá hvørjum húsarhaldi, í nøgdum, tann sama í 2001 og 2002, har hvørt húsarhald keypti 10,64 kg., meðan eginnýtslan hjá hvørjum húsarhaldi, í virði, vaks úr £58,61 til £60,69 (3%), og sostatt øktist samlaða peninganýtslan frá 2001 til 2003.

Eginnýtslan av sjóføðslu fyri hvørt húsarhald varð í 2002 mett at vera umleið £2,33 mia. og mett varð, at hendan nýtslan fór at vaksa til £2,57 mia. í ár 2006. Í hesum metingum er víst á, at størsti vøksturin fór at verða feskar/køldar vørur.

### Smásøluøkið

Á smásøluøkinum í Stórabretlandi varð í 2002 keypt køldur og frystur fiskur fyri £1,65 mia., og harafturat fyri £400 mió fisk í dósum. Hetta staðfestir ein kanning hjá Taylor

Nelson Sofres (TNS).




**Myndil 10. Smásøla av køldum og frystum fiskavørum í Stórabretlandi**
Kelda: TNS

Ein alsamt vaksandi gongd í Stórabretlandi er økta sølan av feskari/køldari sjóføðslu.




**Myndil 11. Samlaða nýtslan køld og fryst sjóføðsla á smásøluøkinum**
Kelda: TNS

## Foodservice (matstovur og stovnar)

Foodservice økið fevnir um £1.4 mia. av teimum eftir meting £4 mia., sum tann bretski brúkarin árliga brúkar uppá sjóføðslu. TNS metir, at tað bretska foodserviceøkið keypir umleið 115.000 tons av sjóføðslu um árið. Toskur, hýsa og laksur eru fiskavørurnar, sum foodservice- økið keypir mest av.

Av samlaða fiskakeypinum hjá foodserviceøkinum telur toskurin 30%. hýsan 18% og laksurin 10%.

## Køldar vørur

Sløk 57% av samlaðu søluni á smásøluøkinum fevnir um køldar fiskavørur. Vøksturin er

nú størrri í søluni av køldum fiskavørum, enn í søluni av frystum vørum.

Aftur her hava ketuhandlarnir eina sterka marknaðarstøðu við 84% av allari søluni av køldum fiskavørum. Hettar er ein øking uppá 12% síðani 2002. Stóru ketuhandlarnir vinna ein enn størri part av marknaðinum, meðan aðrar sølustøðir missa teirra part.

Vøksturin í nýtsluni av køldum fiskavørum hevur fingið eitt lop frameftir, orsakað av øktu søluni av "value-added" (virðisøktum) og raspaðum fiskavørum. Fiskasløg sum t.d. laksur, reyðsprøka og makrelur hava roynst væl, meðan brúkararnir hava brúkt minni til køldan tosk og hýsu síðani 2002. Samlaði miðalprísurin fyri kilo á køldum fiskavørum var £7.43 (52 vikur tíðarskeið endað 17. august 2003).

Fyri køldu toskavørurnar eru tað "value-added" saman við royktum vørum, ið eru vaksandi bæði í prísi og nøgdum, meðan deiggj-innballaðu (battered) toskavørurnar eru í einari minking (umleið 40%), bæði viðvíkjandi nøgd og prísum.

Innballaðu vørurnar eru einasti hýsuvørubólkurin, ið er vaksandi, bæði í prísi og nøgd, meðan allir aðrir hýsuvørubólkar eru í einari mongdar- og prísafturgongd. Tó er greitt, at kiloprísurin fyri innballaða hýsu er væl lægri, enn kiloprísurin fyri tosk, við £4.81 til £6.10 fyri kilo. Í dag eru køld fløk best umtóktu vørurnar av køldu sjóføðsluni. Meiri enn 50% í søluni av køldari sjóføðslu eru køld fiskafløk.

**Frystar vørur**

Nýtslan av frystum fiskavørum fevnir um 43% av samlaðu nýtsluni av sjóføðslu í smásøluliðnum. Støðan hjá stóru ketuhandlunum er enn sterkari á marknaðinum fyri frystar fiskavørur. So mikið sum 92% av søluni í smásøluliðnum verður selt gjøgnum ketuhandlar. Eisini sølan av frystum vørum hevði eina framgongd í 2002 við 4% í virði og 1% av nøgd.

Frystu toskavørurnar eru tær best umtóktu av øllum frystu fiska-vørunum. Sølan av frystum toski á detailøkinum í 2002/2003 var samanlagt £231 mió. Hettar er tó ein afturgongd í mun til undanfarna ár. Fyri allar toskavørubólkarnar tilsamans sæst ein afturgongd. Tó ikki fyri vørubólkin royktur toskur, ið hevur havt eina framgongd bæði í nøgd og prísi, við ávíkavist 9% og 13%.

Vøkstur er bæði í keypsvirði og nøgdum fyri frystu hýsuna, sum nýtararnir tilsamans árliga keypa fyri umleið £74 mió. Virðið í keypinum av frystari hýsu øktist við 12% og

nøgdin øktist við 14%. Hesi tølini fevna um ein vøkstur í vørubólkunum: Lidnir verðar (ready-meals), innballaðar, “natural steaks” og fiskakøkur. Keypið er eisini í framgongd fyri skeljadjór, sum t.d. rækjur.

## Kappingin frá láglønarsamfeløgum

Bretskir fiskaframleiðarar eru spurdir, um teir hava merkt kappingina frá láglønarsamfeløgum, og um hvørjar avleiðingar henda kapping hevur havt fyri framleiðslu teirra. Nærum allir hava á ein ella annan hátt merkt til kappingina frá láglønarsamfeløgum, undantikið nakrir smærri niche-vøru framleiðarar, sum tó vænta, at kappingin fer at økjast í nærmastu framtíð.

Flestu bretsku framleiðarar velja at síggja kappingina frá láglønarsamfeløgum sum eina avbjóðing at menna aðrar vørubólkar, har talan í flestu førum er um bólkar umfatandi feskar køldar vørur. Samstundis er talan um ein møguleika hjá framleiðarunum at fáa eina rávøru frá láglønarsamfeløgunum fyri lægri prís, og sum er á sama ella hægri góðskustøðið enn frammanundan. Í hesum førinum er talan um frystar vørur.

Tá tað snýr seg um kappingina við láglønarsamfeløgini, hava bretsku framleiðararnir rætt og slætt valt at siga: “Don’t compete”, ella avgjørt, at tað ikki lønar seg at kappast við framleiðslu, sum ikki kann kappast við.

Summir framleiðarar vilja vera við, at tað, sum bretar hava í mun til framleiðarar í londum sum Kina og Pólandi, er vitan um bretska marknaðin og bretska brúkaran, sum síðani gevur atgongd til stóru handilsketurnar. Henda vitan skal gagnnýtast soleiðis, at hon mennir bretsku framleiðsluna av verandi vørum og skapar nýggjar vørur til bretska marknaðin. Gongdin seinastu 10 árini hevur verið tann, at teir eru farnir frá rávøruviðgerð, og í staðin til vørumenning, sigur ein av størstu bretsku framleiðarunum.

## Bygnaðurin á bretska marknaðinum

Hesin parturin av frágreiðingini hevur til endamáls at lýsa samlaðu virðisketuna fyri tosk og hýsu í Stórabretlandi. Niðanfyri er settur fram myndil av "virðisketuni", ið lýsir gongdina og liðini frá tí at fiskurin kemur um kaikant í Stórabretlandi, til hann er etin av einum brúkara.

Fyri at fáa eina nágreiniligari mynd av bygnaðinum og aktørunum á bretska marknaðinum verður víst til fylgiskjal I. Í fylgiskjalinum verða luttakararnir í keyps-, framleiðslu- og søluliðnum lýstir, og har greitt verður frá teirra leikluti og virksemi.




**Myndil 12. Virðisketan í Stórabretlandi**
Kelda: Egin framleiðsla

Í fyrsta liðnum í virðisketuni síggjast landingarnar hjá bretskum og útlendskum fiskiførum, ið umboða ein minni part av vørutilgongdini. Meginparturin verður sostatt innfluttur til bretska marknaðin. Í næsta liðnum eru uppboðsølur og hartil fleiri smærri innflutningsumboð. Her fevna uppboðsølurnar um meginpartin av nøgdunum av fiski.

Síðani koma triðja og fjórða lið í virðisketuni, sum eru ávíkavist frumframleiðarir og aðruhondsframleiðarir. Dentur skal leggjast á, at í fleiri førum er talan um framleiðarar, ið virka bæði sum frum- og aðruhondsframleiðarir.

Í fimta liðnum av virðisketuni er talan um søluliðin, ið er seinasti liðurin áðrenn vøran verður seld til endaliga brúkaran. Hesin liður er samansettur av tveimum pørtum. Annar

parturin er smásøluliðurin (retail), meðan hin parturin fevnir um matstovur og ymiskar stovnar (almennar/privatar).

Uttanfyri vanligu liðirnar liggja fleiri smærri keypmenn (traders) og hartil heilsølur. Útfrá einari heldur einfaldari lýsing, so er virksemi hjá keypmonnunum keyp og søla av fiski (ongin virking), oftast í smærri nøgdum, soleiðis at vøran, t.d. kann fara frá fyrsta inn í triðja ella fjórða liðin, t.v.s uttan um annan liðin. Virksemið hjá hesum byggir í stóran mun á teirra kunnleika til marknað og prís á vørum, ið aðrir keyparir og seljarir ávíkavist eftirspyrja og bjóða út. Á sama hátt virka heilsølurnar, tó liggur styrkin hjá hesum í teirra distribusjónsnetið, og ofta virka hesar longri frammi í virðisketuni.

## Niðurstøða

Sostatt er talan um ymisk rák og støðugar broytingar bæði á heims- og bretska marknaðinum fyri sjóføðslu, ið bæði kunnu síggjast sum hóttanir, men eisini sum møguleikar fyri føroyska framleiðslu og útflutning.

Higartil hava vit kunna staðfest, at alheimsnýtslan av sjóføðslu er í eini støðugari menning. Tó er sannlíkt við verandi gongd, at framtíðar útboðið av sjóføðslu fer at vaksa lutfalsliga meiri enn eftirspurningurin. Størsti vøksturin av sjóføðslu fer at verða í framleiðsluni av alifiski, ið fer at vaksa munandi meira enn framleiðslan av veiddum fiski.

Rákið í nýtsluhættunum hjá brúkarunum boðar frá, at brúkarar í størri mun fara at leggja seg eftir feskum køldum vørum. Orsakirnar til hesa gongd eru m.a., at endaligi brúkarin gerst alsamt meiri varðugur um egna heilsustøðu, har góðska og føðslutrygd er í hásæti. Umframt er gongdin tann, at tað skal gerast lættari og høgligari hjá brúkaranum at fáast við tilgerðing av sjómati.

Á hvítfiskamarknaðinum verður væntandi ein minking í útboðnum av siðvandu hvítfiskasløgunum toskur og hýsa. Hóast hesa afturgongd í útboðnum, tykist onki grundarlag vera fyri príshækkingum fyri hesi bæði hvítfiskasløgini. Orsøkin til hesa støðu, er hópframleiðslan av hvítfiski í londum, sum t.d. Kina, ið forðar fyri einari avmarking í útboðnum av hvítfiski. Eisini er kappingin frá øðrum proteinkeldum, sum t.d. høsnarungum, við at ávirka prísin á hvítfiski.

Tá talan er um Stórabretland, hava vit staðfest, at seinastu árini eru landingarnar hjá bretsku fiskiførunum minkaðar alsamt. Samstundis er eftirspurningurin frá brúkarunum eftir sjóføðslu í støðugum vøkstri. Hetta merkir, at Stórabretland er vorðið sera bundið at innfluttari rávøru. Tó hevur hesin vaksandi eftirspurningurin ikki elvt til munandi príshækkingar, tí ein stórur partur av innflutninginum kemur úr láglønarsamfeløgum.

Rákið í bretsku nýtsluhættunum, er fyri ein stóran part tað sama, sum á heimsmarknaðinum. Størri vøkstur er í nýtsluni av feskum køldum fiskavørum. Samstundis fáa stóru handilsketurnar ein alsamt størri part av søluni, og harvið eina tryggari og valdsmiklari støðu á bretska marknaðinum.

Konsolideringin, serliga í framleiðslu- og søluliðunum, hevur sermerkt gongdina á bretska marknaðinum seinastu árini, og fer framhaldandi at ávirka allar luttakarar á marknaði-

num. Framleiðslu- og sølu-fyritøkurnar hava styrkt seg munandi, bæði við at keypa og samskipa eindir, vertikalt sum horisontalt. Úrslitið av hesari konsolidering hevur verið, at ómetaliga strong krøv verða løgd á allar luttakarar í virðisketuni, har brúkarin er í miðdeplinum.

Samstundis sum marknaðarbygnaðurin í fiskivinnuni í Stórabretlandi sýnist at vera samansettur av fleiri smærri luttakarum, er veruleikin heldur, at nakrar fáar stórar fyritøkur sita á megipartinum av teimum nøgdum, ið verða keyptar og seldar á marknaðinum[1]. Í hesum førum er talan um sølu til smásøluøkið við stóru ketuhandlunum á odda.

Myndin av fiskaseljaranum á gøtuni er um hvørva, og siðvandi leikluturin hjá uppboðssølumarknaðunum er eisini í minking. Tað skerst ikki burtur, at luttakararnir gerast færri, og at teir úr hvør sínum enda av virðisketuni verða drignir enn nærri at hvørjum øðrum.

[1] Sí fylgiskjal I

## Útflutningsmynstrið

Í hesum partinum av frágreiðingini verður føroyski útflutningurin av toski og hýsu til Stórabretlands viðgjørdur. Fyrst verða útfluttningshagtølini av báðum fiskasløgunum, frá 1995 og fram til 2004, lýst. Dentur verður lagdur á, at lýsa útfluttningin í nøgd og virði. Síðani verða fiskasløgini býtt upp í vørubólkar, sum í høvuðsheitum er býtið millum ávikavist frystar og køldar vørur. Eisini verða ymisk viðurskifti viðgjørd, ið hava ávirka føroyska útflutningsmynstrið til Stórabretlands, og soleiðis hava verið viðvirkandi til núverandi støðuna.

Leggjast skal aftrat, at tað eru onnur viðurskifti, ið hava eitt meira bygnaðarligt eyðkenni, sum sjálvsagt eisini ávirka føroyska útflutningsmyntrið. Vit hava tó valgt, ikki at gera eina nágreiniliga viðgerð av slíkum viðurskiftum, men bert nevna ávís av teimum seinri í frágreiðingini.

### Innflutningur til Stórabretland

Sum greitt frá er Stórabretland ein stórur innflytari av bæði toski og hýsu. Hóast bretar altíð hava havt egnan fiskiskap, hevur Stórabretland søguliga verið ein av okkara týdningarmiklastu keyparum av hesum fiskasløgum.

Á myndilinum niðanfyri síggja vit nøgdina av føroyskum toski og føroyskari hýsu, sum varð útflutt til Stórabretlands í 2002, samanborið við samlaða innflutningin hetta árið. Um nøgdin verður umroknað til livandi vekt, var útflutningurin av toski við føroyskum uppruna uml. 36.491 tons av einum samlaðum innflutningi uppá uml. 283.000 tons og útflutningurin av hýsu við føroyskum uppruna uml. 22.419 tons av einum samlaðum innflutningi uppá 133.000 tons.

Nøgdin av innfluttum toski umboðaði í 2002 85% av toskinum, sum bretar ótu, meðan nøgdin av innfluttari hýsu var 52%. Føroyski parturin av innfluttu nøgdini av toski og hýsu var ávíkavist 13,9% og 16,9%.




**Myndil 13. Útflutningur av toski og hýsu til Stórabretlands (2002)**

## Onnur útflytaralond og útflutningsvirði

Hyggja vit eftir, hvørji hini útflytaralondini eru, sum fiskurin úr Føroyum kappast við, so síggja vit í talvu 7, at tá talan er um tosk, eru kappingarneytarnir á hesum marknaði lond sum Rusland, Ísland, Danmark, Norra, Kina og Týskland. Størstu upprunalond eru tó Rusland, Ísland, Norra og Føroyar. Harafturat kemur eginframleiðslan hjá Stórabretlandi.

**Talva 7. Innflutningur av toski greinaður eftir útflutningslandi (vøru vekt, CIF virði)**

| Uppruni | Tons | £000 | £/kg |
|---|---|---|---|
| Ísland | 25.533 | 86.088 | 3,37 |
| Rusland | 31.122 | 62.604 | 2,01 |
| Danmark | 13.903 | 40.897 | 2,94 |
| Norra | 12.737 | 39.943 | 3,14 |
| Føroyar | 14.575 | 31.909 | 2,19 |
| Týskland | 6.132 | 18.684 | 3,05 |
| Kina | 7.121 | 15.194 | 2,13 |
| Tilsamans | 119.196 | 315.491 | 2,65 |

Hyggja vit eitt sindur nærri eftir innflutningsvirðinum í talvu 7 síggja vit, at tá talan er um føroyskan tosk, er miðalvirði fyri hvørt kilo lágt, samanborið við fleiri av okkara kappingarneytum. Her eiga vit at leggja merki til, at virðið er eitt miðaltal fyri vøruvekt uppgjørt í CIF virðum, og tekur sostatt ikki hædd fyri, um talan er um eina virkaða vøru, ella um vøran er óvirkað.

Um vit hyggja eftir tí vøruskapi, sum føroyski fiskurin er í, tá hann verður seldur til Stóra-

bretlands, síggja vit, at orsøkin til lága prísin er stóru nøgdirnar av óvirkaðum fiski, sum verður útfluttur. Myndilin niðanfyri er áhugaverdur, tí hann myndar gongdina í føroyska útflutninginum av toski til Stórabretlands yvir eitt longri tíðarskeið, og samstundis lýsir myndilin, hvat hendir við virðinum á hesum útflutningi, tá ið luttfallið millum virkaðar og óvirkaðar vørur broytist munandi.




**Myndil 14Føroyskur útflutningur av frystum og køldum toski til Stórabretlands og miðalprísur (1995-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya

Greitt er, um mált verður í miðalprísi fyri kilo, so veksur lutfallsliga virði av útflutningi-num, tá ið luttfallið av virkaðum vørum mótvegis óvirkaðum vørum gerst størri seinast í nýtiárunum. Um lutfallið av virkaðum mótvegis óvirkaðum vørum gerst minni, so er gongdin tann øvugta við lutfallsligum minni virði, ið eisini hevur verið støðan seinastu árini. Leggjast skal afturat, at myndin og gongdin er tann sama fyri útflutningin av hýsuni sum fyri toskin.

Í talvu 8 síggja vit, at Føroyar eru størsta veitaraland av hýsu til Stórabretlands, um sæð verður burtur frá bretskari eginframleiðslu. Kappingarneytar eru Norra, Ísland og Rus-land. Eisini her síggja vit, at miðalprísurin fyri hvørt kilo, ið útflutt verður úr Føroyum, er sera lágur. Sum greitt frá omanfyri er orsøkin at finna í lutfallinum av óvirkaðum fiski og virkaðum fiski.

**Talva 8. Innflutningur av hýsu greinaður eftir útflutningslandi (vøru vekt, CIF virði)**

| Uppruni | Tons | £000 | £/kg |
|---|---|---|---|
| Føroyar | 14,736 | 26,852 | 1.82 |
| Ísland | 9,087 | 22,655 | 2.49 |
| Norra | 9,114 | 19,984 | 2.19 |
| Danmark | 5,026 | 10,244 | 2.04 |
| Rusland | 6,107 | 9,397 | 1.54 |
| Kina | 1,183 | 2,825 | 2.39 |
| Týskland | 325 | 917 | 2.82 |
| Annað | 2,928 | 4,724 | 1.61 |
| Total | 48,506 | 97,597 | 2.01 |

Kelda: DEFRA

## Toskur

Útflutningurin av toski til Stórabretlands taldi í 2003 umleið 39 prosent av samlaða føroyska toskaútflutninginum[2]. Føroyar útfluttu 11.312 tons av toski til Stórabretlands hetta árið. 35,4% av útflutninginum í nøgd vóru fryst fløk meðan 64,1% var køldur heilur toskur. Í virði var býtið ávíkavist 54,3% og 45,3% av tí samlaða útflutningsvirðinum av toski til Stórabretlands.

Tá vit niðanfyri tosa um frystan tosk og køldan tosk, og seta hesar vørubólkar javnt við ávikavist útflutning av virkaðum toski (fløk) og útflutning av óvirkaðum toski, so er hetta orsakað av, at sera lítið av frystum óvirkaðum og køldum virkaðum toski verður útflutt. Í 2003 var býtið sum víst í talvu 9.

| | Nøgd í tons | Virði í DKK | Nøgd í % | Virði í % |
|---|---|---|---|---|
| Frystur flak | 4.003 | 141.133 | 35,4 | 54,3 |
| Frystur heilur | 21 | 291 | 0,2 | 0,1 |
| Frystur samlað | 4.024 | 141.424 | 35,6 | 54,4 |
| Køldur flak | 8 | 373 | 0,1 | 0,1 |
| Køldur heilur | 7.251 | 117.634 | 64,1 | 45,3 |
| Køldur samlað | 7.259 | 118.007 | 64,2 | 45,4 |
| Toskur samlað[3] | 11.312 | 9.692 | 100,0 | 100,0 |

**Talva 9. Útflutningur av toski til Stórabretland í nøgd og virði í 2003**
Kelda: Hagstova Føroya

[2] Samlaði føroyski toskaútflutningurin í 2003 var 28.838 tons – Hagstova Føroya

[3] Íroknað eru allir útfluttir úrdráttir, sum t.d. livur, rogn og toskafars.

Myndil 15 vísir gongdina í útflutningi av toski til Stórabretlands frá 1990 og fram til 2003. Útflutningurin er býttur í frystar vørur og køldar vørur. Tað er ein trupulleiki fyri greiningina, at tað í hagtølunum ikki ber til at útgreina nøgdirnar av útfluttum sjófrystum flaki og nøgdirnar av landfrystum flaki. Fyri at koma hesum trupulleika til lívs, er nøgdin av sjófrystum flaki mett við støði í veiðuhagtølunum. Nøgdin av flaki er umroknað við einum umrokningarfaktori uppá 2,8 og gingið verður út frá, at allur tann sjófrysti fiskurin verður seldur til Stórabretlands. Sami framferðarháttur er brúktur til at meta um nøgdirnar av sjófrystari hýsu, tó er ein umrokningarfaktorur uppá 2,85 brúktur her.




**Myndil 15. Føroyskur útflutningur av toski til Stórabretlands greinaður eftir vøruslagi (1990-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya og Fiskiveiðueftirlitið

Myndilin er sera áhugaverdur. Vit síggja á myrkabláu stabbunum eina munandi niðurgongd í útflutninginum av frystum toski seinast í nítiárunum, sum síðani leggur seg á eitt nøkulunda javnt støði. Útflutningurin av køldum toski veksur munandi í 1996 og 1997 og fellur síðani aftur um aldarskiftið, fyri síðani at vaksa nógv aftur seinastu árini.

Hyggja vit fyrst eitt sindur nærri eftir útflutninginum av tí frysta toskinum, so síggja vit somuleiðis í myndini, at tað er bæði tann sjófrysti og tann landfrysti toskurin, sum minka. Vit síggja at framleiðsla av landfrystum toski meiri ella minni hvørvur seinnu helvt av nítiárunum, soleiðis at vit seinastu árini, av frystum toski, nærum bert hava útflutt sjófrystan tosk.

Orsøkirnar til hesa gongd eru helst fleiri. Hyggja vit fyrst eftir gongdini í útflutninginum av frystum toski, er givið at kvota skerjingar í serliga russiska partinum av Barentshavinum seinnu helvt av nítiárunum er ein náttúrlig orsøk til at nøgdirnar í sjófrysta útflutninginum lækka.

At onnur framleiðsla úr toski gerst meiri lønandi, er helst ein av orsøkunum til at útflutningurin av landfrystum toski hvørvur um aldarskiftið.

Sum víst á myndlinum niðanfyri hevur prísgongdin innan saltfiskaframleiðslu verið sera góð síðani 1997. Hetta merkir, at serliga saltfiskamarknaðurin hevur verið sera áhugaverdur hjá føroyskum framleiðarum seinastu árini.




**Myndil 16. Saltfiskaútflutningur av toksi í nøgd og prísi (1992-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya

Samstundis sum saltfiskamarknaðurin er jaligur, hevur ein stórur vøkstur verið í framleiðsluni av dupultfrystum toski, sum í størri og størri mun verður framleiddur í láglønarlondum. Í stóran mun er talan um russiskan tosk, sum verður framleidur í Kina. Økta kappingin frá kappingarneytum við einum lægri kostnaðarstøði, kann helst saman við jaliga saltfiskamarknaðinum sigast at vera høvðusorsøkin til at føroyska framleiðsluvinnan ”dettur út” av landfrysta marknaðinum í Stórabretlandi.

Tað er áhugavert at síggja, at aftaná at føroyska framleiðsluvinnan hevur mist ein lut í marknaðinum fyri virkaðan frystan tosk, byrjar sølan av køldum óvirkaðum toski samstundis at vaksa. Orsøkirnar fyri hesa gongd eru eisini fleiri.

Tað kann tykjast, sum framleiðsluvinnan ikki hevur megnað at umskipa seg til aðra lønandi framleiðslu, og tillaga seg, tá ið kappingin frá láglønarlondunum veksur.




**Myndil 17. Veiðan av toski í føroyskum sjógvi (1985-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya

At veiðan av toski samstundis er stór, serliga í mun til kreppuárini í nítiárunum, hevur eisini elvt til stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum køldum toski.

Havast skal tó í huga, sum eisini greitt frá á blaðsíðu 14, at um somu tíð hevur eitt stórt fall verið í landingum av toski í Stórabretlandi, frá bretska heimaflotanum. Hetta hevur havt við sær eitt trot á ráváru til bretsku framleiðsluvirkini, sum tískil hava lagt størri áherðslu á at finna veitarar uttanlands. Óivað hevur hendan gongdin eisini havt ávirkan á stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum toski.

## Hýsa

Útflutningurin av hýsu til Stórabretlands taldi í 2003 umleið 82 prosent av samlaða føroyska hýsuútflutninginum[4]. Føroyar útfluttu 16.100 tons av hýsu til Stórabretlands hetta árið. 15,6% av útflutninginum í nøgd var fryst flak, meðan 83,7% var køld heil hýsa. Í virði var býtið ávíkavist 30,1% og 69,1%, av tí samlaða útflutningsvirðinum av hýsu til Stórabretlands.

Eisini tá vit niðanfyri tosa um frysta hýsu og kølda hýsu og seta hesar vørubólkar javnt við ávikavíst útflutning av virkaðari hýsu og útflutning av óvirkaðari hýsu, so er hetta orsakað av, at sera lítið av frystari óvirkaðari og køldari virkaðari hýsu verður útflutt. Í 2003 var býtið, sum víst í talvu 10.

[4] Samlaði føroyski útflutningurin av hýsu var í 2003 19.646 tons – Hagstova Føroya

| | Nøgd í tons | Virði í DKK | Nøgd í % | Virði í % |
|---|---|---|---|---|
| Fryst flak | 2.516 | 74.771 | 15,6 | 30,1 |
| Fryst heil | 106 | 1.884 | 0,7 | 0, 8 |
| Fryst samlað | 2.622 | 76.655 | 16,3 | 30,8 |
| Køld flak | 7 | 219 | 0,0 | 0,1 |
| Køld heilur | 13.471 | 171.898 | 83,7 | 69,1 |
| Køld samlað | 13.478 | 172.117 | 83,7 | 69,2 |
| Hýsa samlað [5] | 16.100 | 248.772 | 100,0 | 100,0 |

**Talva 10. Útflutningur av hýsu til Stórabretland í nøgd og virði í 2003**
Kelda: Hagstova Føroya

Myndil 18 vísir gongdina í útflutningi av hýsu til Stórabretlands frá 1990 og fram til 2003. Útflutningurin er býttur í frystar vørur, royktar vørur og køldar vørur.




**Myndil 18. Útflutningur av hýsu greinaður eftir vøruslagi (1990-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya og Fiskiveiðueftirlitið

Eisini hendan myndin er sera áhugaverd. Vit síggja á myrkabláu stabbunum, at útflutningurin av frystari hýsu hevur verið rættiliga javnur í nógv ár, meðan útflutningurin av køldari hýsu ikki veksur fyrr enn í seinnu helvt av nítiárunum, minkar um aldarskiftið, fyri síðani at vaksa munandi aftur fyrstu árini í hesi øldini.

Um vit fyrst hyggja eitt sindur nærri eftir útflutninginum av tí frystu hýsuni, síggja vit somuleiðis í myndini, at bæði tann landfrysta hýsan og tann sjófrysta hýsan liggja í eini rímiliga fastari legu alt tíðarskeiðið. Vit síggja soleiðis ikki somu gongd, sum fyri toskin, har landfrysta framleiðslan nærum hvørvur.

[5] Íroknað eru ikki vørur sum t.d. roykt hýsa.

Orsakirnar til hesa øðrvísi gongd eru helst eisini fleiri. Men meginorsøkin er helst, tá talan er um hýsu, eru størri trupulleikar av at framleiða eina dygdarvøru úr frystari rávøru, tí er kappingin minni frá láglønarlondum, sum framleiða dupultfrystar úrdráttir.

Hinvegin skerst heldur ikki burtur, at kapping frá kappingarneytum við einum lægri kostnaðarstøði, sum t.d. Rusland og Kina, hevur við sær eitt lægri heildarprísstøði, sum ger, at framleiðslan ikki er serliga lønandi. At so er, tykist stóri vøksturin í nøgdunum av køldari óvirkaðari hýsu at verða prógv fyri. Tað tykist at vera trupult at økja framleiðsluna av hýsu hóast rávørutilgongdin er góð, sum myndin niðanfyri vísir.




**Myndil 19. Veiðan av hýsu í føroyskum sjógvi (1985-2003)**
Kelda: Hagstova Føroya

Eisini skal tó her havast í huga, at sama fyribrygdi ger seg galdandi, fyri hýsu sum við toskinum, at um somu tíð sum vøksturin í útflutninginum av óvirkaðari hýsu fer fram, er eitt stórt fall í landingum av hýsu frá bretska heimaflotanum. Hetta hevur við sær eitt trot á rávøru til bretsku framleiðsluvirkini, sum tískil leggur størri herðslu á at finna rávøruveitarar uttanlands. Óivað er hendan gongdin, saman við vánaliga kappingarførinum hjá føroysku framleiðsluvinnuni, viðvirkandi til stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðari hýsu.

## Marknaðarsamskipan (Marknaðarintegratión)

Omanfyri hava vit ikki viðgjørt spurningin um marknaðarsamskipan. Tað vil siga, hvussu føroysku fyritøkurnar eru fyri við atlitið at marknaðarvitan, sølu og distributión, tá tær skulu selja sínar vøru á marknaðinum.

Fyri bæði tosk og hýsu tykist sera sannlíkt, at tað ikki bert er talan um kapping frá lágløn-

arlondum, sum hevur við sær stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum fiski. Aftaná at hava tosað við keyparar av føroyskum fiski í Stórabretlandi, er heilt greitt at framleiðsluvinnan í Føroyum als ikki er kappingarfør við t.d. bretsku framleiðsluvinnuna, tá talan er um marknaðarsamskipan. Fyritøkurnar, sum keypa føroyska óvirkaða fiskin, antin umvegis innflutningsumboð ella á uppboðsølu, eru nógv tættari samskipaðar við marknaðin.

Onkur bretskur framleiðari, sum keypur føroyskan fisk sigur, at teir selja regluliga til nógvar og smærri keyparar. Talan kann vera um sølu til fiskahandlar, heilsølur og veitarar til matstovur og stovnar. Hetta merkir, at selt verður til keyparar, sum liggja longur frammi í virðisketuni, og sum tískil ofta kunnu gjalda ein betri prís, samanborið við keyparar av frystum føroyskum fiski.

Eisini er vert at leggja til merkis í sambandi við landfrystu søluna, at føroyingar í 1995 seldu stóru framleiðslufyritøkuna Faroe Seafood UK Ltd., sum hevði heimstað í Grimsby, til íslendsku fyritøkuna Coldwater. Talan var um eina stóra fyritøku, sum keypti stórar nøgdir av landfrystari vøru. Eingin ivi er um, at sølan av fyritøkuni eisini hevur haft við sær, at søla av landfrystum toski og hýsu í Stórabretlandi gerst torførari.

## Sølumynstur

Sum greitt frá omanfyri, er marknaðarsamskipanin týdningamikil fyri kappingarføri. Í hesum brotinum vilja vit royna at lýsa, hvussu tann føroyski toskurin og hýsan koma inn á marknaðin, og hvørjir keypararnir eru. Talan er ikki um eina nágreiniliga og vísindaliga kanning, men heldur um eina meting, sum er gjørd við støði í teimum samtalum sum gjørdar eru, bæði við føroyskar útflytarar og keyparar bretska á marknaðinum.

Hyggja vit fyrst eftir toskinum, so er sølumynstrið rættiliga einfalt. Tann sjófrysti fiskurin verður í stóran mun seldur til nakrar fáar heilsølur, sum síðani “ selja - distrubuera” vøruna beinleiðis til matstovur og ávísar ketuhandlar.

Tann køldi toskurin, sum verður avreiddur í skotskari havn, verður fyri tað mesta seldur umvegis uppboðssølu, meðan tann køldi toskurin, sum verður avskipaður úr Føroyum í bingjum, onkuntíð verður seldur á uppboðssølu, meðan ein partur verður seldur umvegis eitt umboð (útflutnings/innflutnings) til bretsk framleiðsluvirkir.

Tað er eitt sindur torført at meta um lutfallið í nøgdunum, sum fara umvegis bretska uppboðssølu, og nøgdirnar sum fara umvegis eitt umboð til framleiðsluvirkir. Men mett verður, at uml. 70% fara umvegis uppboðssølu, meðan restin uml. 30% fara uttan um

uppboðssølurnar.

Útflutningsmynstrið fyri hýsuna er rættiliga líkt mynstrinum fyri toskin. Sjófrysta hýsan, eins og toskurin, fer umvegis heilsølur til matstovu- marknaðin, meðan kølda óvirkaða hýsan fer umvegið uppboðsølu, ella beinleiðis umvegis umboð, til framleiðsluvinnuna. Landfrysta hýsan verður seld til aðruhondsframleiðarar.

Útflutningsmynstrið fyri tosk og hýsu kann myndast sum víst í myndlinum niðanfyri:




**Myndil 20. Útflutningsmynstur fyri tosk og hýsu**
Kelda: Egin framleiðsla

## Niðurstøða

Tá talan er um bretska marknaðin fyri føroyskan tosk og hýsu, so hevur hesin søguliga verið týdningamikil fyri føroysku fiskivinnuna og føroyska samfelagið. Sum veitaraland av toski og hýsu hava Føroyar verið, og eru av stórum týdningi fyri Stóra Bretland.

Gongdin seinastu tíggju árini hevur tó havt við sær stórar broytingar í útflutningsmynstrinum av toski og hýsu til Stórabretlands. Útflutningurin av landfrystum toski er nærum horvin, samstundis sum útflutningurin av óvirkaðum køldum toski er vaksin sera nógv. Tilsvarandi er lutfallsliga virði á hesum útflutningi minka seinastu árini. Sama mynstur er eisini galdandi fyri kølda óvirkaða hýsu, meðan sølan av landfrystari hýsu tykist verða meiri støðug. Sølan av sjófrystu vørunum seinastu árini hevur verið støðug bæði fyri tosk og hýsu.

Fleiri viðurskifti hava viðvirka til broytingina í útflutningsmynstrinum. Serliga er kappingarføri hjá føroysku framleiðsluvirkjunum versnað munandi seinastu tíggju árini, serliga sum ein avleiðing av nýggju kappingarneytunum úr Ruslandi og Kina. Eisini má ásannast, at marknaðarsamskipanin hjá føroysku framleiðsluvirkjunum í Stórabretlandi er vánalig, samanborin serliga við bretsku kappingarneytarnar. Hetta sæst eisini aftur í sølumynstrinum av føroyskum toski og hýsu, har meginparturin av fiskinum verður seldur ígjøgnum fyrstu liðuni á bretska marknaðinum.

Samanumtikið kann sigast, at føroyska framleiðsluvinnan hevur ikki megnað at finna lønandi framleiðslur úr toski og hýsu til bretska marknaðin, hóast rávørutilgongdin hevur verið góð.

## Hvat er til ráða at taka?

Tað kann tykjast eitt sindur "abstrakt" at siga, at gongdin seinastu árini er eitt úrslit av broyttum kappingarfyritreytum, sum er ein avleiðing av alheimsgerðini, men í stóran mun er hetta veruleikin. Spurningurin, vit eiga at seta okkum, er tí: Hvussu møta vit á bestan hátt hesari avbjóðing, og hvussu tryggja vit at okkara samfelag ikki bert verður ein útflytari av rávøru, men heldur kann mennast til eitt framkomið fiskivinnusamfelag?

Vanliga tá tosað verður um alheimsgerðina og ta hóttan, hon er fyri vinnulívið í vesturheiminum, verður sagt, at talan er ikki um eina hóttan, um bert vinnulívið í vesturheiminum klárar at flyta seg fram í virðisketuni, hetta frá sonevndari frumframleiðslu til eina meiri vitanartunga framleiðslu. Áherðsla eigur at verða løgd á høgan "produktivitet", vøru- og marknaðarmenning, har vinnan ger sær dælt av tí høga kunnleika og vitanarstøðinum í vesturheiminum. Alheimsgerðin skal vendast frá at vera ein hóttan til ein møguleika.

Tó er tað at flyta eina vinnu fram í virðisketuni ikki nakað, ein kann gera frá degi til dags. Og møguliga ber hetta ikki til yvirhøvur. Møguliga eru forðingarnar ov stórar, og møguliga hava vit ikki neyðuga kunnleikan og vitanarstøðið, sum er neyðugt.

Áðrenn hugt verður nærri eftir hesum viðurskiftum, eiga vit at gera okkum greitt, hvørjir møguleikar eru at velja í millum. Niðanfyri eru sett fram nøkur uppskot. Tað er greitt, at ymisku møguleikarnir allir hava við sær týdningamikil samfelagslig árin.

a) Lata standa til. Einki verður gjørt fyri at betra um kappingarførið hjá framleiðsluvinnuni.

b) Loyva verksmiðjuskipum at fiska og framleiða tosk og hýsu, fiskaða á føroyska landgrunninum.

c) Menna landframleiðsluna soleiðis, at hon kann flyta seg fram í virðisketuni.

Vit hava valt bert at hyggja eftir møguleika c). Hetta orsakað av, at vit ikki meta tað vera skilagott, at lata standa til. Til tess at meta um møguleikan, at loyva verksmiðjuskipum at fiska og framleiða tosk og hýsu fiskaða á føroyska landgrunninum, krevur eina neyva kanning, áðrenn metast kann hvørt hesin møguleiki, bæði vinnuliga og samfelagsliga, er skilagóður.

Hyggja vit nærri eftir møguleika c), sum er at menna landframleiðsluna soleiðis, at hon kann flyta seg fram í virðisketuni, so hevur hesin møguleikin við sær, at framleiðsluvinnan fer undir øðrvísi framleiðslu av toski og hýsu. Nýggjar vørur mugu framleiðast og til nýggjar marknaðir. Uttan at fara í smálutir tykist greitt, at framleiðsla av virðisøktum vørum, sum t.d. feskum køldum vørum, innballaðum vørum (coated), royktum vørum og lidnum verðum, eru hóskandi møguleikar.

Vit hava t.d. sæð, at okkara kappingarneytar úr Íslandi fyri fleiri árum síðani eru byrjaðir at menna aðrar marknaðir í Stórabretlandi, har kappingin er meiri til teirra fyrimun. Seinastu árini er útflutningurin av køldum toska- og hýsufløkum, sum loftvegis verða flutt til Stórabretlands, vaksin munandi.




**Myndil 21. Útflutningurin av feskum fløkum úr Íslandi til Stórabretlands (1994-2004)**
Kelda: Hagstova Íslands

Íslendska vinnan hevur í ávísan mun megnað at flutt sína framleiðslu frá einum marknað, har kappingin er herd, til ein marknað har íslendska vinnan hevur nakrar kappingarfyrimunir.

Eisini hava vit sæð, at størru íslendsku framleiðsluvirkini hava styrkt sína støðu á marknaðinum fyri virðisøktar vørur. Hetta er tó ikki gjørt við at menna framleiðslu í Íslandi, men heldur at menna egna framleiðslu í Stórabretlandi, og sum greitt frá á blaðsíðu 52, við at keypa framleiðsluvirkir í Stórabretlandi, sum hava sáttmálar við stóru handilsketurnar.

Í Norra hevur sama gongdin eyðmerkt útflutningin av hvítfiskasløgum. Skifti frá frystum til fesk køld fløk er í støðugari menning. Feskastu tølini vísa, at norski útflutningurin av feskum toska flaki í 2003-2004 vaks í virði, við 86 prosentum. Útflutningurin av feskum hýsu og upsa fløkum vaks í virði við ávíkavist 124 og 51 prosentum í sama tíðarskeiði. Um somu tíð hevur ein afturgongd verið í útflutninginum av øllum frystum blokkvørum og flak-vørum av toski, upsa og hýsu.[6]

## Er tað møguligt hjá føroysku framleiðsluvinnuni at flyta seg fram í virðisketuni?

Til tess at svara hesum spurningi, fara vit niðanfyri at hyggja eftir nøkrum av teimum viðurskiftum, sum eru týdningamiklir, um eitt tílíkt skifti skal lata seg gera. Mong viðurskifti kundu verið áhugaverd, men vit hava valt at hyggja serliga eftir:

- Góðsku- og góðskustýringsskipanum
- Sporføri
- Kostnaðarstøði
- Fiskiveiðiumsiting
- Flutningi
- Grindadrápi
- Strategic Partnership
- Vøru- og marknaðarmenning

[6] NSEC - Eksportutvalget for fisk 11-01-2005

# Týðandi viðurskifti - skulu vit flyta okkum nærri marknaðinum

## Góðska og góðskustýringsskipanir

Góðskan á føroyskum toski og hýsu fær bestu skoðsmál frá bretskum framleiðarum og umboðum fyri uppboðssølumarknaðir. Hinvegin er góðskan á føroysku hýsuni versnað nakað seinastu árini, serliga tí hon hevur verið smáfallandi. Men yvirhøvur er góðskan á einum høgum støði, eisini tá samanborið verður við Ísland og Norra. Bretskir framleiðarir siga, at í dag er eitt høgt góðskustøði ikki bert ein treyt, men ein fyritreyt fyri at kappast á bretska marknaðinum. Um góðskan ikki er í lagi, so kunnu rávøruveitarar, sum t.d. Føroyar, gloyma alt um at gera seg galdandi á bretska marknaðinum.

Eitt sum er vorðið alt meiri vanligt í Stórabretlandi er at fiskaframleiðarar nýta góðskustýringsskipanir (Quality Management Systems) millum rávøruveitaran, egna framleiðslu og síðani sølulíðið. Umframt leggja fiskaframleiðarar, ið selja meginpartin av teirra vørum til retail kundar, serliga stóran dent á at hava væl virkandi góðskustýringsskipanir. Krøvini frá retail kundunum eru ógvuliga strong til tess at tryggja, at endaligi nýtarin av vøruni fær røttu góðskuna.

Góðska og góðskustýringsskipanir kunnu ikki sigast at vera ein forðing fyri føroyskari fiskavøruframleiðslu og útflutningi á bretska marknaðin. Góðskustýringsskipanir eru og hava verið partur av føroyskari framleiðslu í longri tíð. Hinvegin kann hugsast, at vit í Føroyum fara at hyggja eftir heildarloysnum, ið liggja tættari at framtíðar ynskjum og krøvum hjá sølufyritøkum, ið selja til endaliga brúkaran. Ein møgulig heildarloysn kundi verið ein samantvinnan av góðskustýring við einari sporførisskipan.

## Sporføri (traceability)

Seinastu tíðina hevur verið nógv tosað um traceability ella sporføri í matvøruframleiðslu, eisini í fiskavøruframleiðslu. Fyribrigdið hevur stungið seg upp, mest orsakað av altjóðagerðingini, men eisini orsakað av einari styrktari brúkararørslu (consumerism). Altjóðagerðingin hevur m.a. havt við sær, at ymiskt tilfar í matvøruframleiðslu kann hava sín uppruna úr øllum heimsins londum. Í hesum sambandi er neyðugt við skipanum, sum kunnu spora hetta tilfar/vøru til upprunakelduna, um nú eitthvørt eiturevni ella líknandi skuldi verið í tilfarinum, til tess at tryggja og verja brúkaran.

Fyri ikki at gerast ein eftirbátur, er tað greitt, at føroyingar mugu finna útav, hvussu vit skilabest seta í gongd eina skipan, ið tryggjar fult sporføri í føroyskari fiskiveiðu og framleiðslu.

Til hesa frágreiðingina vóru ymiskir bretskir fiskavøruframleiðarar spurdir beinleiðis, um hvussu týdningarmikið sporføri er í teirra framleiðslu. Nærum allir framleiðarar leggja sera stóran dent á, at vøran, ið teir keypa, kann sporførast, bæði aftur til upprunakelduna, og fram til, tá lidna vøran liggur á hylluni í sølubúðini. Á sama hátt sum við góðskuni á vøruni, merkja fiskavøruframleiðararnir eitt sera stórt trýst frá ketuhandlunum, at vøran skal kunna sporførast. Í hesum førinum er kanska serliga talan um fiskavøruframleiðarar, ið selja til ketuhandlarnar ella ein hópmarknað, har brúkararørslan er serliga sterk.

Ávísir framleiðarar hava í sambandi við kravið um sporføri, valt at tvinna hetta saman við teirra verandi góðskustýringsskipanir. Aðrar tøknifrøðiligar loysnir eru framdar í Stórabretlandi við at nýta flístøkni á fiskakassum. Upplýsningar um fiskin kann lesast elektroniskt og fjarlesast við radiobylgjum. Tað er umráðandi at finna eina loysn frá føroyskari síðu sum lýkur ES krøvini, men ikki minst eina loysn, sum tøknifrøðiliga fellur inn í aðrar skipanir allan vegin í virðisketuni.

Ein møgulig føroysk loysn kann vera ávegis, tí í verandi løtu ger føroyska smápartafelagið Bitland, eitt samtak av 12 føroyskum fyritøkum, eina verkætlan, ið hevur til endamáls, at øll sporførisdata í føroysku fiskivinnuni verða flutt digitalt millum liðini í virðisketuni.

Sporføri hevur kanska minni týdning, tá ið talan er um framleiðarar av niche-vørum. Hetta kom fram undir samrøðu við framleiðara av royktari hýsu, har hesin segði sporføri ikki vera eitt krav frá sínum kundum. Hinvegin varð fult sporføri í fiski og fiskavørum eitt krav frá ES 1. januar 2005, og tí var framleiðarin ikki í iva um, at sporføri í hansara framleiðslu fór at verða neyðugt, ikki orsakað einum kundakravi, men heldur orsakað vaksandi ES krøvum í matvøruframleiðslu.

## Kostnaður og prísur

Sum við allari framleiðslu, er kostnaður sjálvsagt sera týdningarmikil. Kanska serliga er kostnaðarstýringin umráðandi í framleiðsluni av matvørum, sum t.d. fiskavørum. Á sama hátt sum við góðskuni á fiskinum, er tað ein fyritreyt, at kostnaðurin á fiskinum ella prísurin á rávøruni er kappingarførur. Hinvegin eru bretskir fiskaframleiðarar samdir um, at teir ikki bert kunnu hyggja eftir prísinum, men at tað er heildin sum er umráðandi, t.v.s. at góðska, prísur, nøgd og veitingartrygd o.s.fr. Tó er torført at taka dagar ímillum, hvørji av hesum viðurskiftum er mest umráðandi.

Samstundis sum ketuhandlarnir hava fingið alsamt meiri at siga á marknaðinum, er høvuðsdenturin broyttur frá at verða lagdur bert á prísin, til at fevna meiri um eina heild

av ymiskum viðuskiftum. Tó er hetta ikki galdandi fyri allar vørur, men kanska serstakliga fyri vørur, sum t.d. fesk fløk til ketuhandlar. Í hesum førum arbeiða veitarar til ketuhandlar ofta við fleksiblum príssáttmálum, har veitarin afturfyri lýkur ávísar treytir, sum t.d. eitt ávíst nøgdar- og góðskustøði, veitingartrygd og reglusemi.

Sum longu staðfest, eru føroyingar ikki kappingarførir í prísi, tá ið talan er um siðvandar frystar vørur, sum eru í beinleiðis kapping við láglønarsamfeløg. Hinvegin er ivasamt, um føroyingar eru kappingarførir í øðrum vørubólkum, t.d. fesk fløk ella í value-added vørum. Hetta má síggjast við atliti at fleiri ymiskum viðurskiftum.

Uttan mun til føroyska kostnaðarstøðið, serliga lønarkostnaðin, so eru møguleikarnir fyri at kappast á javnum støði við vørum, ið liggja longri "frammi" í virðisketuni, munandi betri, við t.d. íslendskar og norskar vørur.

## Burðardygg fiskiveiðiumsiting (sustainability)

Tá ið bretskir framleiðarar skulu velja rávøruveitarar, verður sera stórur dentur lagdur á, at rávøran hevur sín uppruna úr einum landi, har fiskivinnan verður umsitin á ein burðardyggan hátt. T.d. vilja fleiri bretskir framleiðarir ikki keypa fisk, ið er veiddur á bretskum øki, tí serliga toskastovnarnir í hesum økjum sigast at vera sera illa fyri. Enn einaferð eru tað krøvini frá stóru handilsketunum á smásøluøkinum og sterka brúkararørslan, ið leggja eitt stórt trýst á allar partar og øll lið í virðisketuni.

Føroyar og føroyska fiskivinnan kann møguliga gera sær dælt av hesari støðu. Serliga tá ið hugsað verður um bretska áhugan fyri føroyskari fiskiveiðiumsiting, har Føroyar ofta verða nýttar sum ein fyrimynd fyri burðadyggari umsiting.

Yvirhøvur er hugburðurin hjá bretsku framleiðarunum, at fiskiveiðan í londum sum Føroyum, Íslandi og Norra verður umsitin á ein burðardyggan hátt. Tí gera bretskir framleiðarar, ið keypa rávøruna úr áðurnevndu londum, nógv burturúr, til tess at siga sínum kundum frá hvaðani rávøran hevur sín uppruna.

Hartil samstarvar ein stórur partur av fiskaframleiðsluvinnuni í Stórabretlandi saman við ymiskum náttúruverndarstovnum og sølufyritøkum, til tess at flokka og seta mát fyri burðadyggari framleiðslu fyri sjóføðslu. Eitt av hesum samtøkunum er Marine Stewardship Council (MSC), ið kann samanberast við kenda "svanamerkið". Fleiri av teimum spurdu fiskaframleiðarunum søgdu seg antin hava fingið MSC viðurkenning, ella so fóru teir at fáa hesa viðurkenning í næstum.

Ein møguligur trupulleiki í hesum sambandi kann verða, at Føroyar ikki lúka treytirnar fyri at at fáa viðurkenning frá MSC. Hinvegin, so er støðan enn tann, at flestu lond, ið kunnu sigast at verða tættastu kappingarneytar føroyinga, heldur ikki í núverandi støðu fáa MSC viðurkenning. Tó er ongin ivi um, at um føroyskur toska- og hýsufiskiskapur var MSC góðkendur, hevði hetta styrkt munandi um støðuna hjá framleiðsluvinnuni á flestu útflutningsmarknaðum okkara. Undir øllum umstøðum, hevði talan verið um stórar kappingarfyrimunir til ta fiskivinnutjóð, ið gjørdist tann fyrsta at vinna sær altjóða viðurkenning.

Enn er ein partur av framleiðsluvinnuni í Stórabretlandi, ið leggur minni dent á, um rávøran er veidd á bretskum økið, ella um hendan stavar frá norðanlondum. Í flestu førum er her talan um framleiðarar, ið framleiða vørur til minni matstovur, sum t.d. fisk og kips búðir ella vertshús. Keyparar á hesum støðum sýnast at leggja minni í burðardygga fiskiveiðu og framleiðslu. Men sum áður nevnt, er støðan øðrvísi á retail økinum og hjá teimum stóru ketuhandlunum.

## Grindadráp

Nakað sum kann gerast ein marknaðarforðing fyri føroyskan tosk og hýsu í Stórabretlandi er føroyska grindadrápið. Í øllum førum siga stóru bretsku aðruhonds framleiðararnir, at føroyska grindadrápið er ein stórur meinbogi, um teir skulu keypa føroyskan fisk og framleiða hendan til stóru bretsku handilsketurnar.

Hinvegin søgdu somu framleiðarar, at um føroyski fiskurin var kappingarførur mótvegis íslendskum ella norskum fiski, so kundi tað væl hugsast, at føroyska vøran varð tikin fram um aðrar vørur, hóast føroyskt grindadráp.

Tó er væl møguligt, at orðið “grindadráp” hevur ein negativan hjátýdning og at hetta frá fyrstani tíð kveikir eitt sjálvirkandi noktandi svar, tá ið ein spyr framleiðarar og keyparar av føroyskum toski og hýsu. Tí skal fyrivarni takast um hugburðin hjá bretsku fiskaframleiðarunum mótvegis føroyskum grindadrápi og avleiðingarnar fyri søluna av føroyskum toski og hýsu.

Uttan mun til hugburðin mótvegis føroyskum grindadrápi, so vóru tað einstakir framleiðarar, ið keyptu føroyska hýsu, tí hetta var eftir teirra tykki besta rávøran. Fyri hesar framleiðarar hevði spurningurin um hvalaveiðu ella grindadráp ongan ella lítlan týdning. Um føroyingar skuldu “flutt” seg nærri brúkarunum í virðisketuni, er væl hugsandi, at viðurskifti sum grindadráp kann gerast ein størri vansi og fáa avleiðingar fyri føroyskan fiskaútflutning. Í hesum sambandi er neyðugt við áhaldandi kunning til marknaðin, og

møguliga skuldu serligar tilbúgvingarætlanir verið gjørdar. M.a. verða serligar tilbúgvingarætlanir nýttar í arbeiðnum hjá norska fiska-útflútningsráðnum í sambandi við negativa fjølmiðlaumtalu av norskari alivinnu. Norðmenn ynskja í hesum sambandi at hava møguleikan at mynda og skapa eitt størri fjølbroytni í fjølmiðlaorðaskiftinum.

Sjálvt um bæði norðmenn og íslendingar reka vinnuliga hvalaveiðu, so sýnist føroyska grindadrápið at vekja størri mótstøðu hjá brúkaranum í Stórabretlandi mótvegis føroyskum vørum, enn tá ið talan er um mótstøðu mótvegis norskum ella íslendskum vørum. Uttan mun til allar sannroyndir, er tað fatanin hjá brúkaranum, sum er avgerandi í spurninginum um føroyskt grindadráp. Tí mugu framhaldandi átøk fremjast til tess at ávirka fatan brúkarans.

## Samskipan av flutningi

Bretskir keyparar og framleiðarar av fiskavørum leggja sera stóran dent á, at teirra rávøra kemur til røttu tíðina og á ein hátt, ið tryggjar bestu góðskuna. Flutningssambandið millum rávøruveitara og framleiða var ein av høvuðsorsøkunum til, at framleiðararnir høvdu valt verandi rávøruveitara av feskum fløkum.

Í hesum sambandi var loftvegis flutningurin úr Íslandi av feskum fløkum ofta nevndur. Hjá bretsku framleiðarunum, ið selja fesk fløk til ketuhandlarnar, hevur loftvegis flutningurin alstóran týdning. Vøran, ið teir selja til ketuhandlarnar, er ikki meira enn 24 tímar gomul, tá ið hon fer inn á hyllurnar í sølubúðunum. Í verandi løtu er talan næstan bert um fesk fløk úr Íslandi, ið verða flogin til Humberside flogvøllin, beint uttanfyri Grimsby og Hull. Afturat hesum er, at tað er møguligt hjá einum bretskum framleiðara at bíleggja bæði størri og smærri nøgdir av feskum fløkum úr Íslandi, alt eftir hvat teirra kundar vilja hava.

Ynskini hjá stóru framleiðarunum sýnast at vera at menna fleiri loftvegis flutningsambond til veitarar úr øðrum londum, til tess at spjaða teirra rávørugrundarlag. Hetta kann verða ein møguleiki, ið føroyingar kunnu gera sær dælt av.

Loftvegis flutningssambandið úr Íslandi til Stórabretlands er eitt úrslit, ið spurdist burturúr, tá framleiðarar í Íslandi og framleiðarar í Stóra- bretlandi tóku lógvatøk saman. Sami møguleiki er til staðar fyri føroyskar fyritøkur. Í hesum sambandi sigur ein av bretsku framleiðarunum, at hann hevur verið í samband við føroyskar fyritøkur, at kanna møguleikarnar fyri loftvegis flutningi úr Føroyum til Stórabretlands.

Eitt er vist, at uttan loftvegis flutningssamband millum Bretland og Føroyar, verður tað sera trupult at kappast á javnum føti, við t.d. Ísland, á marknaðinum fyri feskar køldar vørur. Tí er loftvegis samband at kalla ein fyriteyt í hesum førinum, um eingin onnur loysn er tøk.

Í hesum sambandi gerst tað ógvuliga týdningarmikið, at hugt verður eftir fleiri møguligum loysnum á einari flutningssamskipan millum Føroyar og Stórabretland. Hetta er neyðugt bæði til tess at veita tað neyðugu veitingartrygdina og reglusemi til marknaðin, og røkka bretska marknaðin við vørum, sum eru kappingarførar.

## Strategic Partnership

Á einum framkomnum føðsluvørumarknaði sum tí bretska, er hugtakið “strategic partnership” vorðið ein partur av dagliga virkseminum millum allar partar í virðisketuni. Tískil er umráðandi, at vit eisini frá føroyskari síðu seta okkum inn í hetta tankamynstur.

Í hugtakinum liggur m.a., at partar í einari virðirsketu, í ein ávísan mun, sameina virksemi sítt til tess at økja um produktivitetin og skapa enn skjótari loysnir fyri kundan. T.d. kann ein seljari og keypari gera sær dælt av sínámillum ágóðum við at skilja tvørleikarnar og deila vitanina hjá hvørjum øðrum. Hetta letur eisini upp fyri møguligum peningaligum íløgum millum partarnar, soleiðis at partarnir í virðisketuni verða drignir nærri at hvørjum øðrum, bæði á einum vitanar og ognaarrættarligum støðið.

Ein av størstu framleiðarunum í Stórabretlandi greiðir frá, at tað er neyðugt við strategiskum handilsfeløgum, tí fimm stórar handilsketur ráða á bretska marknaðinum. Tískil er neyðugt við lykla-handilsfeløgum, um krøvini frá handilsketunum skulu gangast á møti, og um lønsemi skal fáast í virkseminum.

Sostatt gerst alsamt meiri neyðugt hjá øllum liðum í føroysku fiskivinnuni at nýta og menna verandi vitan, og deila hesa vitan, til tess at kunna bjóða seg fram sum ein javnbjóðis partur í einum strategiskum samstarvi við aðrar, og soleiðis draga til sín bæði nýggja og neyðuga vitan og hartil fíggjarligar íløgur. Serliga viðkomandi er hesin møguleiki hjá føroysku vinnuni, tá ið hugsa verður um verandi støðu, serliga í framleiðslu og søluliðnum.

Ikki ber til at siga, í hvønn mun føroyskir fiskavøruframleiðarar og/ella útflytarar til Stórabretlands, hava tikið hugtakið “strategic partnership” at sær. Tó er tað greitt frá kanningunum í sambandi við hesa frágreiðing, at meginparturin av føroyska útflutninginum av

toski og hýsu til Stórabretlands er uttanfyri slíkar samgongur.

Uttan mun til verandi føroysku luttøkuna í strategiskum handilsfelagsskapum, má hetta tykjast at vera ein møguleiki hjá føroyskari framleiðslu at koma nærri at marknaðinum og betra um kappingarføri.

## Vøru- og marknaðarmenning

Greitt er, at føroyskur útflutningur til Stórabretlands rakar fyrstu liðini í bretsku virðisketuni. Um føroyskar útflutningsvørur skulu koma longri inn í bretsku virðisketuna, er neyðugt við serligari vitan og kunnleika, til tess at menna verandi vørur og marknaðir, og eisini vitan til at menna nýggjar vørur og marknaðir.

Um ein skal verða kappingarførur á einum framkomnum marknaði, ið er rikin av brúkarunum saman við nøkrum fáum handilsketum, er neyðugt við einum stórum atliti at marknaðarbroytingum. Her er ikki bert talan um broytingar á prísstøðinum, men kanska serliga broytingar í brúkaramynstrinum, vanum o.s.fr.. Kunnleikin og evnini til tess at lesa hesar broytingar, og ein tilsvarandi tillagan kann gerast avgerandi.

Sostatt er neyðugt hjá føroysku vinnuni at vinna sær tað neyðugu vitanina og kunnleikan, ið kann føra føroyska framleiðslu longri fram í bretsku virðisketuni. Tað sama gerst neyðugt hjá føroyskum fyritøkum, um hesar skulu uppfatast sum ein egnaður og verðuligur partur av áðurnevndu strategisku partnerships.

Hinvegin er atgongdin til ta neyðugu vitanina munandi nervað av tí veruleika, at føroyska vinnan ikki er til staðar á marknaðinum við egnum fyritøkum. Eisini er tað veruleiki, at føroysku framleiðslueindirnar eru luttfalsliga smáar við trongum fíggjarætlanum, ið ikki kunnu rúma størri íløgum til tess at útvega sær marknaðarkunning.

Tó er tað framvegis soleiðis, at tann núverandi føroyska vitanin um bretska marknaðin ella marknaðaratlit, antin ikki til staðar, ella verður hendan ikki fult roynd. Í øllum førum eru nógvar ábendingar, at føroyska vinnan hevur havt trupult at tillaga seg broyttu marknaðarviðurskiftini.

## Hugburðurin hjá bretum mótvegis føroyskari fiskivinnu

Tá ið bretski framleiðarin skal velja ein rávøruveitara, verður stórur dentur lagdur á tey søguligi sambondini og tær samstarvsroyndir, ið ein hevur havt við veitarar gjøgnum

tíðirnar. Sambært fleiri bretskum framleiðarum, eru tað ofta royndirnar og søguliga sambandið millum seljara og keypara, ið fær avgerandi týdning í valinum av rávøruveitara. Í hesum sambandi fáa føroyingar bestu skoðsmál, og verða mettir sum álítandi og eitt fólkaslag, ið dugir at halda orð.

Hinvegin er hugburðurin hjá flestu bretsku framleiðarnum tann, at føroyingar altíð hava verið eitt stig aftanfyri, tá um vørumenning og marknaðaratlit ræður. Hesin hugburður kann forða fyri at føroysk framleiðsla og framkomin rávøra sleppur inn um gáttina hjá stóru bretsku framleiðarunum. Framleiðararnir siga m.a., at Føroyar aldrin hava gingið á odda í primér fiskavøruframleiðslu, og at føroyingum vantar eitt størri atlit at endaliga brúkaranum og marknaðinum. Úrslitið hevur verið, sum ein av stóru bretsku framleiðarunum tekur til: "...the Faroes is looked at as a place where whole fish comes from." Fleiri líknandi útsagnir komu fram í samrøðum við aðrar bretskar framleiðarar.

Haraftrat verður Ísland ofta nevnt sum dømi um, hvussu føroyingar skuldu havt gjørt og borið seg at í mun til marknaðarmenningina. Sambært einum bretskum framleiðara hugdi íslendska vinnan frameftir í virðisketuni og spurdi hvørja vøru, marknaðurin spurdi eftir og hvørja vøru, teir megnaðu at framleiða í kapping við aðrar. Síðani fóru íslendsku framleiðararnir undir at útbyggja og menna flutningssambandið til marknaðin.

Sjálvandi skulu hesar útsagnir takast við fyrivarni, serliga tí talan er um ávísar vørubólkar. T.d. eru frystu fløkini, ið verða framleidd umborð á føroysku verksmiðjutrolarunum væl umtókt av bretsku keyparunum. Harumframt eru tað fleiri smærri bretskir keyparar, ið gleðast um fesku føroysku hýsuna, ið fæst til keyps á bretska marknaðinum. Tó skerst tað ikki burtur, at í hesum førinum er talan um óvirkaða vøru, har virðisøkingin verður framd og ágóðin av hesum virksemi liggur í Stórabretlandi.

## Niðurstøða

### Viðgerð og raðfesting av týdningarmiklum viðurskiftum

Samanumtikið kann sigast, at tað eru fleiri ymisk viðurskifti, ið bæði eru týdningarmikil og sera avgerandi, meðan onnur viðurskifti hava minni týdning fyri førøyskar vørur, um hesar skulu røkka longur fram í bretsku virðisketuni.

Talvan niðanfyri vísir tey viðurskifti, ið verða mett at vera antin ein stór ella minni forðing, og sum annars hava ein avgerandi týdning fyri menningina av føroyskari framleiðslu og útflutningi til Stórabretlands.

| Viðurskifti | Forðing/ikki forðing |
|---|---|
| Góðsku - og góðskustýringsskipanir | Ikki ein stór forðing |
| Sporføri | Ikki ein stór forðing |
| Føroyska kostnaðarstøðið | Stór forðing |
| Flutningsmøguleikarnir | Stór forðing |
| Føroyski hugsunarhátturin og áskoðan á vinnuvirksemi | Sera stór forðing - neyðugt við nýhugsan |
| Marknaðarvitan | Sera stór forðing |
| Burðardygg fiskiveiðiumsiting | Ivasamt, kann gerast ein stór forðing |
| Grindadráp | Er/kann gerast ein stór forðing |

Viðvíkjandi góðsku- og góðskustýringsskipanum er tað ein treyt, at hesi viðurskifti eru í lagi frá føroyskari síðu. Tó kann hetta ikki tykjast at verða ein sera stórur trupulleiki, bæði tá ið hugsað verður um høga verandi góðskustøðið, og eisini um royndirnar við verandi góðskustýringsskipanum.

Hinvegin er tað umráðandi, at góðskustýringsskipanir kunnu sameinast við skipanir hjá luttakarunum í bretsku virðisketuni. Sama er galdandi fyri møguligum sporføris-skipanum, sum eru eitt krav frá ES, og tí má ein føroysk loysn finnast. Tað verður ikki mett, at hetta er ein stórur trupulleiki, serliga tí vit í Føroyum í løtuni arbeiða við at finna eina tekniska loysn, til tess at lúka ES kravinum um sporføri.

Ein stórur meinbogi hjá føroysku vinnuni mótvegis tættastu kappingarneytunum er høga føroyska kostnaðarstøðið, serliga lønar- og orkuútreiðslur. Tað stendur púra greitt, at føroyingar í verandi støðu ikki eru kappingarførir á bretska marknaðinum, tó eru sjófryst toska- og hýsufløk enn undantikin. Tí vildi kappingargrundarlagið blivi betri, um føroyingar framleiddu vørur, ið komu inn á marknaðin longri frammi í virðisketuni, og uttan mun til kostnaðarstøðið.

Burðardygg fiskiveiðiumsiting er eitt sera umráðandi viðurskifti, ikki bert hjá vinnu og

myndugleikum, men eisini í hugaheiminum hjá brúkarunum. Í løtuni sýnast Føroyar at verða rættiliga væl fyri hesum viðvíkjandi. Tað er tó ivasamt, um føroyskur fiskiskapur eftir toski og hýsu høvdu kunna fingið MSC góðkenning. Eingin ivi er um, at tað hevði verið ein stórur fyrimunir fyri føroyska vinnu, um føroyski fiskiskapurin fekk hesa viðurkenning.

Grindadráp er og hevur í ávísum førum verið ein forðing í marknaðar-føringini av føroyskum vørum, og er Stórabretland í hesum førinum onki undantak. Spurningurin um grindadráp kann gerast ein enn meira átroðkandi trupulleiki, um føroyskar vørur koma nærri at brúkarunum, serliga í smásøluliðnum. Tí má okkurt gerast, bæði frá almennari, sum privatari síðu. Í stórum ræður tað um at arbeiða miðvíst fyri at ávirka verandi støðu, serliga við atliti at fatanini hjá brúkaranum av hesum viðurskiftum.

Eisini má okkurt gerast fyri at bøta um flutningsmøguleikarnar hjá føroysku fiskivinnuni, og samskipa hendan flutning soleiðis, at hetta stuðlar vørum, ið eru førar fyri at raka bretska marknaðin longri frammi í virðisketuni. Til tess at bøta um føroyska kappingarførið, er neyðugt at menna verandi flutningssambond, samstundis sum roynt verður at menna nýggjar flutningsskipanir, bæði loftvegis og sjóvegis.

Harumframt er neyðugt við einari broyting í føroyska hugsunarháttinum og áskoðanini á vinnuvirksemi. Í staðin fyri bert at “fylgja øðrum”, er neyðugt við nýhugsan, til tess at menna verandi og nýggjar vørur og marknaðir.

Til hetta krevst at útvega sær tað neyðugu marknaðarvitanina. Sum skilst, so kann hetta í einum føroyskum høpi, verða sera trupult og kostnaðarmikið. Tí er neyðugt at kanna, hvussu føroyingar fáa betri atgongd til hesa vitan og íløgur, ið er avgerandi fyri menningina og kappingarførið hjá føroyskum vørum á marknaðinum í Stórabretlandi.

## Onnur týdningamikil viðurskifti

Omanfyri hava vit tikið samanum ymisk viðurskifti, sum eru týdningarmikil, um føroyska framleiðsluvinnan skal kunna flyta seg longri fram í virðisketuni. Hesi viðurskifti eru sera týðandi og eru helst ein fyritreyt, um eitt tílíkt skifti skal lata seg gera. Tað eru tó eisini onnur viðurskifti, sum eru eins týdningamikil og sum hava eitt meiri bygnaðarligt eyðkenni.

ES lóggáva, serliga á handilsøkinum, fevnir eisini um Stórabretland og rakar sostatt eisini føroyskan útflutning, og virkar til tíðir sum ein forðing fyri menning av hesum útflutnings-

marknaði. Hetta er serliga viðkomandi, tá ið talan er um, at Føroyar skulu fara undir at framleiða og útflyta fleiri value-added vørur. Til dømis kann nevnast, at Føroyar hava eina innflutningskvotu uppá 1200 tons, tá talan er um paneraðar fiskavørur til ES marknaðin, laksur undantikin. Eftir kvotuna uppá 1200 tons fellur ein tollur á vørurnar uppá 20 prosent.

Nevnast kann eisini, at okkara framleiðsluvinna er í dag í stóran mun almenn ogn og er tí ikki altíð før fyri at taka avgerðir, sum byggja á handilsligar fyritreytir. Vinnan er somuleiðis kapitalveik og eyðkend av at framleiðsluvirkini eru smá. Feløgini klára ikki at gera íløgur, sum ikki kasta vinning av sær beinanvegin.

Haraftrat, er einki føroyskt felag, sum í altjóða høpi er eitt sterkt felag, og sum megnar at ganga á odda í nýhugsan, og "føroyska" hugsanin um at framleiðsluvirkir og skip skulu verða sundurliðaði, kann verða ein forðan fyri neyðugu menningini.

## Til seinast

Samanumtikið kann sigast, at skal føroyska fiskivinnan megna at flyta seg longri fram í virðisketuni, skulu stór stig takast. Neyðugt er við eini hugburðsbroyting bæði í vinnuni og í politisku skipanini. Ein fyritreyt fyri at takast kunnu stór stig er, at vinna og politiski myndugleikin arbeiða eftir sama leisti, har politisku karmarnir stuðla undir eina felags hugsjón um eitt framtíðar framkomið føroyskt fiskivinnusamfelag.

# Fylgiskjal I – Bygnaðurin á bretska marknaðinum

## Innflutnings- og útflutningsumboð

275 innflutningsumboð eru í dátuskránni hjá Seafish, men hendan skráin er tó ikki fult dagførd. 265 av hesum umboðunum vóru eisini skrásett sum útflutningsumboð. Innflutningsumboðini hava meginpartin av virksemi sínum í Bretlandi gjøgnum sambond við veitarar og útlendsk útflutningsumboð.

Heldur enn at tryggja sær nýggjar kundar, er størsta avbjóðingin hjá einum innflutningsumboðið at tryggja eina støðuga og regluliga veiting av røttu góðskuni. Útboðið av toska- og hýsuvørum er sjálvsagt grundað á eina veiðu av einum náttúrutilfeingi. Sostatt eru ymisk viðuskifti, ið ávirka hetta útboðið, og harvið eisini virksemið hjá innflutningsumboðnum.

Vøruveitarar hjá bretsku innflutningsumboðnum kunnu vera útlendsk útflutningsumboð, útlendsk fiskifør og framleiðarir. Innflutnings-umboðini keypa sum oftast í stórum nøgdum, og eisini endurpakka og skilja ávís umboð fiskin. Ógvuliga vanligt er, at innflutningsumboðini hava avtalur við veitarar um góðskustýringskipanir, til tess at tryggja, at vøran til kundan er merkt á rættan hátt og av røttu góðskuni.

Rávørutilgongdin til framleiðsluliðið er sum oftast tryggjað gjøgnum stutt- og langtíðaravtalur, meðan ein minni partur av rávøruni verður handlaður á spotmarknaðinum. Hetta fyribrigdi sæst aftur í allari virðisketuni, har roynt verður at tryggja eina støðuga rávørutilgongd, men har eisini høvið er at gera sær dælt av møguligum marknaðar-møguleikum.

Samanborið við onnur handilsøkir, er óstøðugur prísur á rávøru-marknaðinum og stutt haldføri á tí keyptu vøruni, við til at leggja eitt ovurstórt trýst á innflutningsumboð, ið handla við fiski. Tískil er eitt netverk og know-how avgerandi forðing hjá nýggjum umboðum, ið ætla sær inn á marknaðin. Vanliga verða langtíðarsølusáttmálar ikki nýttir millum innfluttningsumboð og kundar teirra.

## Uppboðssølumarknaðir og innlendismarknaðir

### Uppboðsølumarknaðirnir

Uppboðssølumarknaðirnir eru í havnabýum, har tann seldi fiskurin bæði kemur frá skipum/bátum, ið landa á staðnum, og frá øðrum havnum, haðani fiskurin verður fluttur til uppboðssølurnar. Uppboðssølumarknaðirnir kunnu bæði vera sonevndar “shout” uppboðssølur, ella nútímans elektroniskar uppboðssølur, bæði við og uttan møguleika

fyri fjarboði. Seljararnir á uppboðssølunum eru umboð fyri skip og onnur søluumboð. Fyritøkan aftanfyri uppboðs-sølumarknaðin luttekur vanliga ikki í keypinum og søluni, men syrgir bert fyri hølum og øðrum slíkum viðurskiftum (udantøk finnast).

Vanliga eru keypararnir á hesum uppboðssølum framleiðarar, heilsølur og aðrir keyp-menn. Stóru framleiðararnir innflyta sjálvir vanliga størsta partin av teirra rávøru, tískil nýta hesir uppboðssølurnar bert til tess at fylla munin í goymslum teirra. Hinvegin seta smærru keypararnir størri álit á uppboðssølurnar sum rávørukeldur. Marknaðir av hesum slagi eru m.a. í Scrabster, Fraserburgh, Peterhead, Aberdeen, Eyemouth, Grimsby, Hull, Brixham og Plymouth. Ávísir uppboðssølumarknaðir sum t.d. Fishgate í Hull hava bæði uppboðsølu og beinleiðis sølu av innfluttum fiski. Fleiri marknaðir í Bretlandi kunnu bjóða køliútgerð til innfluttan fisk.

Mesti fiskurin á uppboðssølumarknaðunum verður maskinskildur í ymiskar støddir, og fiskurin verður seldur í kassum. Vektin á kassunum er ymisk frá marknaði til marknaða, men vanliga viga kassarnir millum 40-50 kilo. Á ávísum marknaðum, sum t.d. Hull, er tað vanligt, at kassarnir verða merktir við upplýsningum um fiskifar, veiðiøki og veiðihátt.

Meginparturin av fiskinum. ið verður seldur á uppboðssølu-marknaðunum, er kruvdur og við høvdinum á. Tó er eisini ein minni nøgd av ókruvdum fiski (rounders) til sølu. Eingin marknaður sigur seg selja frystan fisk á vanligari uppboðssølu.

**Innlendismarknaðir**

Innlendismarknaðir eru vøruhús, ið hýsa heilsøluumboðum og keypmonnum, ið keypa fisk og fiskavørur frá framleiðarum og fiska-innflytarum, sum síðani selja fiskin víðari til veitarar til matstovuvinnuna og til almenningin. Av hesum innlendismarknaðum kunnu nevnast Billingsgate, Manchester og Birmingham. Billingsgate er størsti innlendis fiskamarknaðurin í Stórabretlandi. Árliga sølan á Billingsgate marknaðinum er mett at vera £150 mió., og í miðal verða eini 25.000 tons av fiski og fiskavørum seld gjøgnum keypmenninar á Billingsgate. Innlendismarknaðirnir líkjast frá uppboðs-sølumarknaðu-num í vøruslagnum, sum er til sølu. Á innlendis-marknaðunum fáast bæði viðgjørdar og óviðgjørdar fiskavørur.

## Keypmenn (Traders)

Keypmenn kunnu sigast at vera fyritøkur, sum keypa og selja fisk, og møguliga tiðna, umpakka og selja í smærri nøgdum, men høvuðsskilnaðurin er, at fyritøkurnar ikki skera ella beinleiðis viðgerða vøruna á nakran hátt. Keypmenninir keypa fisk á uppboðssølum,

beinleiðis frá skipum og frá øðrum keypmonnum og innfluttningsumboðum. Teir selja til framleiðarar, smásølur, matvirkir (caterers) og til smærri keypmenn.

Nakað av virkseminum hjá keypmannsfyritøkunum kann sigast at vera sera líkt virkseminum hjá heilsølum. Tó virka keypmenn vanliga fyrr í virðisketuni, tað vil siga nærri fiskiførunum og í byrjanini av ketuni. Virksemið hjá keypmonnunum er luttfallsliga lítið og fevnir bert um ein lítlan part av virðisketuni.

## Framleiðsla

### Frumframleiðarar

Virksemið hjá frumframleiðarunum er í høvuðsheitum: avhøvding, kryving, vasking, skering, fleking og reinskering. Frumviðgjørdu vørurnar verða vanliga meirviðgjørdar, áðrenn hesar endaliga verða seldar til matna. Undantakið eru sjálvsagt fesku køldu vørurnar, ið verða seldar í teirra náttúruliga skapi.

### Aðruhonds framleiðarar

Høvuðsvirksemið hjá aðruhonds framleiðarunum er pakking, frysting, kóking, royking, reinskering, lakasalting, salting, marinering, rasping, niðursjóðing, MA pakking (modified atmosphere) og tilgering av liðugum døgverðum. Summar fyritøkur eru vertikalt integreraðar við bæði frum- og aðruhonds framleiðslu, hesar verða nevndar “mixed processors” ella blandaðir framleiðarar.

Tali á bretskum framleiðslueindum var 518 í 2002/2003. Hetta er ein minking frá 1995, tá ið 719 eindir vóru. Tó er støddin á hesum eindum vaksin, við 40.8 fulltíðarstørvum fyri hvørja framleiðslueind í miðal í 2002/2003. Samanlagt vóru 21.000 fulltíðarstørv í bretsku fiskaframleiðsluvinnuni í 2002/2003.

Av teimum samlaðu 518 framleiðslufyritøkunum, vóru 203 fyritøkur (39%) í frum framleiðsluni, 244 (47%) fyritøkur fingust við bæði frum- og aðruhonds framleiðslu, meðan 71 (14%) arbeiða bert í aðruhonds framleiðsluni. 406 (78%) av teimum 518 fyritøkunum fingust við framleiðslu av botnfiski, meðan 220 (42%) av teimum framleiddu skeljafisk.

Hóast tað kann tykjast sum framleiðsluvinnan í Stóra Bretlandi er smábýtt, er veruleikin ein heilt annar. Framleiðslueindirnar eru seinastu árini vornar størri og størri, við tí úrslitið, at heilt fáar fyritøkur nú eru ráðandi á marknaðinum. Nevnast kann, at bæði Young’s Bluecrest og Coldwater, sum eru størstu fyritøkurnar á marknaðinum, og fleiri av hinum stóru framleiðarunum, hava uppkeypt kappingarneytar seinastu árini.

**Talva 3. Størstu framleiðslufyritøkurnar í Stórabretlandi**

| Fyritøka | Søla (mió.) |
|---|---|
| Young's Bluecrest | £500 |
| Coldwater | £240 |
| Birds Eye | £100 |
| Smales | £ 80 |
| Cumbrian | £ 75 |
| Northern Foods | £ 60 |
| Pinneys | £ 60 |
| Lyons (SIF) | £ 51 |

Kelda: Young's Bluecrest

Gongdin seinastu árini vísir eisini, at stóru framleiðslufyritøkurnar, í enn størri mun, leggja virksemi teirra í ídnaðarmiðdeplar, umframt teirra virksemið í havnarbýunum. Talvan niðanfyri vísir, at meginøkini fyri framleiðslu eru Humberside, suður/miðøkið/Wales og landnyrðings parturin av Skotlandi (Grampian).

**Talva 4. Framleiðslueindir og tal av starvsfólkum**

| 2002/2003 | Eindir | Persónar |
|---|---|---|
| Highlands & oyggjar | 40 | 934 |
| Grampian | 109 | 3.880 |
| Aðrastaðni í Skotlandi | 40 | 2.391 |
| Norður Ongland | 60 | 2.987 |
| Humberside | 117 | 5.095 |
| Suður/Midlands/Wales | 73 | 4.177 |
| Útsynnings Ongland | 47 | 822 |
| Norður Írland | 32 | 856 |
| UK samlað | 518 | 21.142 |

Kelda: Sea Fish Industry Authority database

Ein kanning av bretsku fiskaframleiðsluni í 2000 vísti, at miðalkostnaðurin á rávøruni hjá frum og blandaðu framleiðarunum var umleið 68% av samlaða virðinum á søluni, og samlaði beinleiðis framleiðslukostnaðurin var umleið 90% av samlaðu søluni. Samlaði beinleiðis framleiðslukostnaðurin fevnir um rávørukeyp, lønir, orku, flutning, pakking og aðrar beinleiðis útreiðslur.[7]

Sama kanningin vísti eisini, at samlaða virðið á søluni hjá frum framleiðarunum varð mett at vera £332 mió. og hjá blandaðu framleiðarum £1.149 mió., ið gav tilsamans eitt sølu-

[7] Seafish: 2000 survey of UK Sea Fish Processing Industry

virðið í 2000 uppá £1.481 mió.. Seafish metti, at samlaða sølan hjá framleiðsluvinnuni (uttan sølu til aðrar framleiðarar) í 2000 var umleið £2 mia.

## Heilsølur

Heilsølufyritøkurnar virka sum vøruveitarar í virðisketuni. Vanliga verður tosað um tvey sløg av heilsølufyritøkum, ið verða bólkaðar eftir støðd. Smærru heilsølufyritøkurnar keypa oftast feskan fyrstuhond frumviðgjørdan fisk frá bretskum fyritøkum, við ætlanini at selja fiskin víðari til smærri fyritøkur í matstovuvinnuni, fisk og kips búðir, sjálvstøðugar smásølur ella til aðruhonds framleiðslufyritøkur. Nakað av virkseminum hjá smáheilsølunum líkist virkseminum hjá keypmannsfyritøkunum (trading), men virksemið hjá heilsølunum er vanliga nærri at marknaðinum í virðisketuni.

Millum heilsølufyritøkurnar eru eisini innflytarar og tær stóru distri-busjónsfyritøkurnar, ið veita til vertshús og matstovuketir á matstovumarknaðinum. Stóru distribusjónsfyritøkurnar eru eyðkendar fyri at veita lidnar value added fiskavørur, tó verða aðrar vørur eisini veittar. Ávísar stórar heilsølufyritøkur innflyta eisini frystan fyrstuhondsframleiddan fisk, sum síðani verður seldur til aðruhondsframleiðarar. Í nógvum førum tiðna ella umpakka hesar fiskin, áðrenn hann verður seldur.

Lítið er annars av upplýsningum um bretska heilsøluvirksemið, tí hetta virksemið verður í flestum førum rikið av framleiðslufyritøkum. Gitingar hava verið, at heilsølurnar eru uml. 120 í tali, men hetta talið kann tykjast ov høgt, tí talan ofta er um fleiri virkingarstøð, men hjá somu fyritøkuni.

## Smásøluliðurin (ketuhandlar og fiskaseljarar)

endaliga søluliðnum vinna stóru ketuhandlarnir enn størri part av marknaðinum, meðan smærru sjálvstøðugu fiskaseljararnir gerast alsamt færri í tali. Í 2002 vóru umleið 1600 smærri fiskaseljarir í Stórabretlandi.

Í smásøluliðnum vóru í 2002 uml. 71.8% av sjóføðsluni selt gjøgnum ketuhandlar, dósavørur ikki íroknaðar.

**Talva 5. Tal av fiskaseljarum eftir støðd á umsetningi í 2002**

| Umsetningur (£000) | Tal av fyritøkum |
|---|---|
| 1 - 49 | 415 |
| 50 - 99 | 480 |
| 100 - 249 | 435 |
| 250 - 499 | 165 |
| 500 - 999 | 65 |
| 1000 - 4999 | 40 |
| 5000+ | 0 |
| Samlað | 1.600 |

Kelda: Business Monitor PA1003 – Size Analysis of UK Businesses

Meðan smærru sjálvstøðugu fiskaseljararnir gerast færri í tali, so hava flestu ketuhandlarnir fingið teirra egnu fiskasølubúðir, og harvið hevur "fiskasølubúðin inni í ketuhandlunum", tikið siðvanda leiklutin frá sjálvstøðuga fiskaseljaranum á gøtuni. Ávísir ketuhandlar hava fingið fyrrverandi sjálvstøðugar fiskaseljarar at reka sølubúðirnar inni í ketuhandlunum, til tess at varðveita ein part av eyðkendu siðvenjuni hjá fiskaseljarunum.

## Matstovumarknaðurin og almennir stovnar (Foodservice)

Á hesum økinum í søluliðnum verður vanliga skilt millum profit-økið og cost-økið. Profit-økið fevnir um matstovur, gistingarhús, fast-food (fisk- og kips) kaffistovur o.s.fr.  Cost-økið fevnir um teir stovnar og virkir, har stuðul verður latin á ein hvønn hátt. Millum annað er talan um útbúgvingarøkið (fólkaskúlar, lærdar háskúlar o.s.fr.), heilsuøkið (privat og almenn sjúkrahús, ellis- og røktarheim), og harumframt er talan um fongsulsøkið.

Samlaða foodservicevinnan verður mett at fevna um 163.187 eindir, av hesum eru 75.470 eindir, ið beinleiðis fáast við sølu og veitan av fiski. Myndil 14 vísir býtið millum ymisku sølustøðini, har matstovur og vertshús hava størsta partin, meðan kaffistovur, gistingarhús og fisk- og kipsbúðir hava ein minni part.

**Myndil 14. Prosent-býti eftir slag av sølustaði**




Kelda: Marknaðurin fyri fisk á Foodservice økinum. TNS. desember 2003

Mett verður, at árliga keypur foodservicevinnan 115.000 tons av fiski/sjóføðslu. 65% av hesum er saltvatnsfiskur, skeljafiskur er 25% meðan feskvatnsfiskur er 10%. Í talvu 6 sæst, at toskur er best umtókta fiskaslagi við 31%, hýsan telur 18%, laksur 10% og síðani rækjur,ið telja 8% av keypinum hjá foodservicevinnuni.

**Talva 6. Árligt innkeyp av best umtóktu fiskasløgunum til matstovur og stovnar**

| 2002 | Vekt | % |
|---|---:|---:|
| Toskur | 35.865 | 31% |
| Hýsa | 20.612 | 18% |
| Laksur | 10.952 | 10% |
| Kaltvatns rækjur | 8.735 | 8% |
| Heitv atns rækjur | 2.458 | 2% |
| Scampi | 6.968 | 6% |
| Langoustine | 554 | 1% |
| Samlað | 86.144 | 76% |

Kelda: The market for fish in the Foodservice sector. TNS. December 2003

Fisk- og kipsbúðirnar eru ráðandi leikararnir í foodservicevinnuni, har hesar umboða ein triðing av samlaða keypinum av fiskinum til foodservicevinnuna (37.851 tons) og uml. 9% av øllum sølustøðunum innan foodservice.*

* Almennir stovnar eru ikki við í útrokningunum

Myndilin niðanfyri vísir høvuðsformarnar av vørum, ið verða framleiddar av teimum mest vanligu rávørunum. Myndin er tann sama fyri tosk og hýsu. Vístar eru eisini høvuðs-hjávørurnar, ið standast av framleiðsluni.

**Myndil 13. Høvuðsvørur av toski grundað á vanlig rávørusløg**




Kelda: KPMG AS, Centre for Aquaculture and Fisheries

SENDISTOVA FÖROYA Í LONDON
55 Sloane Street · London SW1X9SR · United Kingdom
Tel.: +44 (0)20 7333 0227 · Fax: +44 (0)20 7333 6707
faroes.representation.uk@tinganes.fo

TEAM85